# FFbladið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 368 Hósdagur 1. juni 2006 15,-




Síða 21

## Løgmaður fremur sensur

Lýsir bert sjónarmið hjá "sínum" fjølmiðlum á heimasíðu.













# Fiskivinnufróðskaparsetur í Scalloway

Síða 6

Hevur næmingar úr Falklandsoyggjunum men ikki úr Føroyum.

## Pløyen í Hetlandi

Vit hava lisið ferðafrásøgnina frá 1839.

Síða 18



Kærunevndin:

## ALS kann koyra ommur til skips

Staðfestir at einki atlit skal takast uttan læknaváttan.

Síða 5

## Er útvarpið politiskt korrupt?

Enn eitt dømi um politiska bílegging av tíðindum.

Síða 3

# FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf. 311689 · fax 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin



Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annanhvønn hósdag



**100% tryggleika?**



**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

Mobil Oil Føroyar

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 3, Boks 13
FO-110 Tórshavn
Tel 310354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo



## Vit hava útgerðina



- Flótitrol
- Snurpunótir
- Botntrol
- Aliútgerð
- Rækjutrol
- Annað

**VÓNIN**

Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 474 200
Telefax 474 201

Tórshavn:
Vestara bryggja 12
100 Tórshavn
Telefon 354391
Telefax 31 33 19

info@vonin.com - www.vonin.com



SAXOFØN
TLF. 31 68 08



## Næmingar til Føroya Banka

### Set framtíðina í bankan

Vit leita eftir nøkrum ungum, ágrýtnum fólkum, sum skulu vera við til at leiða Føroya Banka inn í framtíðina. Vilt tú vera ein av okkum, so kunnu vit bjóða tær eitt avbjóðandi og lærurikt næmingapláss í einum áhugaverdum og spennandi umhvørvi.

Vit vænta, at tú hevur áræði, ert útvend/ur og umhugsin, og at tú dugir at arbeiða saman við øðrum.

Tað er fyritreyt, at tú hevur staðið HH, HF, student ella líknandi.

Send umsóknina í seinasta lagi 31. mai 2006 til:

**Føroya Banki**
*Postsmoga 3048*
*110 Tórshavn*
Att.: Bjarki Mohr

Skriva eitt sindur um, hví vit skulu velja júst teg. Við umsóknini skalt tú senda

- prógv frá loknari skúlagongd
- ummæli frá møguligum øðrum størvum

Les meira á heimasíðu okkara: www.foroyabanki.fo
Hevur tú annars okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, so send ein teldupost til: bjarki.mohr@foroyabanki.fo

Ætlandi verða næmingar settir á deildum bankans í Tórshavn, Norðurstreymoy, Vágunum, Klaksvík, Eysturoy og Suðuroy.



FØROYA BANKI


**Gerst haldari fyri bert 250 krónur um árið og fá meira fyri minni tvær ferðir um mánan**

## Útvarpið:

# Politiskt korrupt ella bert leti?

Vit hava havt nógvar umrøður um støðið á tíðindaflutninginum í útvarpinum og kringvarpinum annars.

Tað seinasta dømi er hetta:

Í tíðindunum 19. mai vóru tíðindi um, at NA-bólkurin á Fólkatingi nú fer í hernað fyri at bøta um viðurskiftini hjá børnum í donskum flóttafólkalegum. Andstøðan á fólkatingi hevði sett fram uppskot til samtyktar um ítøkiligar ábøtur á viðurskiftini.

Tann 22. mai eru aftur partar av somu tíðindi. Nú er tað tjóðveldsflokkurin, sum er farin í hernað. Í hesum sambandi hevur hann - "í samstarvi" við hinar andstøðuflokkarnar - sett fram umrødda uppskot, sum tilsamans hevur fingið stóra rúmd í útvarpinum.

### Hetta er øll søgan, sum hon ikki var lýst

Vit undraðust á, at vit ikki sóu nakað um henda "hernaðin" í donsku fjølmiðlunum og fóru so at kanna, hvat ið var í hesum tíðindunum.

Fyrst er at siga, at í danska fólkatinginum ber til - eins og í løgtinginum - at seta fram fyrispurningar til ein ráðharra. Men í danska fólkatinginum ber eisini til - í sambandi við viðgerðina av svarinum upp á fyrispurningin - at seta fram uppskot til samtyktar, og kann tað bæði verða gjørt av andstøðu og samgongu í sama máli. Hesin møguleiki gevur møguleikan at seta fyrispurningar nógv størri innihald enn í løgtinginum, har fyrispurningar ofta bert eru eitt slag í luftini. Men hetta er so eitt annað mál.

Tað hevur leingi verið semja millum andstøðu og stjórn í Danmark um, at neyðugt er at bøta um viðurskiftini hjá umrøddu børnum. Integratiónsnevndin hjá fólkatinginum hevur vitjað eina slíka legu í apríl, og m.o. tann konservativa Henriette Kjær, sum umboðar ein stjórnarflokk, gjørdi beinan vegin vart við, at her mátti okkurt gerast.

Hetta førir so til, at donsku andstøðuflokkarnir í fólkatinginum tann 25. apríl seta ráðharranum fyrispurning um,



Tíðindi

**Norðuratlantsbólkurin vil betra umstøður hjá flóttabørnum**

fríggjadagur, 19. mei 2006 09.47 - Útland

Norðuratlantsbólkurin á fólkatingi fer nú í hernað fyri at bøta um umstøðurnar hjá børnum á donskum flóttarfólkalegum. Truplu umstøðurnar í flóttarfólkalegunum, serliga hjá børnunum, hava fingið stóra rúmd í donskum fjølmiðlum í seinastuni.

Andstøðan á fólkatingi hevur nú sett uppskot fram um ítøkiligar ábøtur á flóttarfólkalegunum. Við í uppskotinum eru Sosialdemokratarnir, Radikali Flokkurin, SF, Eindarlistin og Norðuratlantsbólkurin.

Í uppskotinum til samtyktar stendur, at álagt verður stjórnini at bøta um umstøðurnar skjótast gjørligt. Børnini á legunum skulu hava størri virkismøguleikar, og barnafamiljurnar skulu hava meiri pláss. Eisini skal eitt evsta mark setast fyri, hvussu leingi fólk kunnu vera í flóttarfólkalegunum.

*Samb. útvarpið kann lættliga fáast tann fatan, Norðuratlantsbólkurin hevur staðið í fremstu røð í "hernaðinum" at bøta um vilkorini hjá flóttabørnum. Veruleikin er í hvussu er, at hann hevur staðið í aftastu røð. Hetta er bert eitt dømi um hvussu føroysku miðlarnir snøgga tíðindini til alt eftir hvørji ørindini eru við teimum. Eitt annað dømi er "tíðindaflutningurin" um tilfeingisgjaldið í sjónvarpinum seinasta heyst, sum nærmast má kallast ein falsan.*

Úr BT 21. mai.



**Flere penge til asylbørn**

**Regeringen afsætter flere penge til børn af afviste asylansøgere. Pengene skal gå til undervisning, bedre fritidstilbud og rådgivning - og føre til hjemrejse.**

*NA-bólkurin er ikki komin á hermótið fyrr enn aftaná, at danska stjórnin er komin við uppskoti um at játta eyka 37 mill. til umrødda endamál.*



*2) Initiativer til forbedring af forholdene for børnefamilierne mv. på asylcentrene*

På børneområdet gennemføres i 2006 en række initiativer med henblik på at give børn og ungegruppen mere struktur og indhold i hverdagen: Indførelse af modersmålsundervisning, udvidet SFO tilbud – det udvidede SFO tilbud omfatter en generel udvidelse af åbningstiden i dag- og aftentimerne samt fuldt SFO-tilbud i børnenes skoleferie (sommerferie) samt øget specialisering (individuelt tilpassede) af undervisningstilbud for børn og unge. Der afsættes 19,0 mio. kr. i 2006.

*Hetta er bert eitt brot úr longu frágreiðingini hjá Rikke Hvilshøj um tær ítøkiligu ætlanir, sum hon hevur at bøta um umstøðurnar hjá umrøddu børnum.*

hvat hann ætlar at gera í hesum máli.

Norðuratlantsbólkurin var als ikki við til at seta hendan fyrispurningin!

Nakað samstundis leggur flóttafólkaráðharrin fyri fólkatingið uppskot um at játta 37 mió. kr. til at bøta um nevndu viðurskifti.

Tann 18. mai kemur fyrispurningurin til viðgerðar, og framsøgumaður var tann radikala Elsebeth Gerner Nielsen, og millum aðrar framsøgumenn var eisini Høgni Hoydal.

Men tað er ikki fyrr enn nú, at NA-bólkurin kemur inn í myndina, tá hann í samband við fyrispurningin saman við 80 øðrum andstøðutinglimum leggur fram eitt uppskot til samtyktar. Tað kann nú ikki sigast, at uppskotið sum er nakað serliga ítøkiligt við sínum seks reglum. Her verður sagt:

*Forholdene på de danske asylcentre er rystende ringe og uværdige. Det kan vi ikke være bekendt at byde andre mennesker. Forholdene for især børnene er rystende. Folketinget pålægger derfor regeringen at få forbedret forholdene hurtigst muligt, herunder - at sikre bedre forhold på asylcentrene med flere aktiviteter for børnene og ekstra plads til børnefamilierne - at sætte en øvre grænse for opholdstiden på asylcentrene, så vi ikke som i dag oplever familier, der har været på centrene i op til 7 år.*

At viðurskiftini trongdu til ábót var longu ásannað av øllum donskum flokkum frammanundan. Ein størri ella minni partur av hesum tilmæli var longu við at vera framdur við umrødda uppskoti hjá ráðharranum. Hetta uppskot hevur ikki verið mett so mikið týðandi, at danska pressan tykist yvirhøvur at hava nevnt tað.

Tað kann í hvussu er sigast, at leikluturin hjá NA-bólkinum er ikki annað enn, at hann hevur lagt navn til eitt uppskot til samtyktar, sum er eitt úrslit av einum fyrispurningi, sum hann **ikki** hevur verið við til at seta, og hetta er gjørt **eftir**, at danska stjórnin hevur tikið ítøkilig stig á júst hesum økinum.

### Manipulatiónin hjá útvarpinum

Tað kann sigast heilt vist, at umrøddu tíðindini í útvarpinum geva ikki allan sannleikan um hetta málið. Málið er stak illa lýst. Tíðindini eru greitt snarað og snøggað soleiðis til, at bert tað, sum kann gagna sakina hjá NA-bólkinum, er við. Hóast ikki eitt orð er ítøkiliga skeivt, so skapar hetta eina slíka slagsíðu, sum greitt má sigast at vera manipulatión. Verður alt tikið við, er ringt at síggja, hvør "hernaður" hjá NA-bólkinum skal liggja í umrødda uppskoti.

Spurningurin er so, hvør orsøkin er til, at útvarpið kemur við slíkum "hálvum sannleikum" sum tíðindi.

Tað kunnu vera ein ella tvær orsøkir. Onnur orsøkin kann vera tann, at tað hevur verið ætlaða endamálið at reka politiska propaganda fyri NA-bólkin fyri at gagna hansara umdømi. Tað eru ótald dømi um tað sama, sum t.d. hvussu útvarpið rann ørindi fyri somu kreftir fyri at stýra tíðindaflutninginum í einum meira ella minni óheftum blaði.

Hin orsøkin kann snøgt sagt vera leti. Tann, sum fylgir við, veit, at tað er eingin politiskur journalistikkur í útvarpinum. Politisk tíðindini eru stórt sæð bert upplestur av innsendum tilfari frá polikkarum sjálvum. Tað eru tískil teir og ikki tíðindafólkini sum seta karmarnar fyri tíðindaflutninginum. Hann er samb. fráboðaða prinsippinum hjá Jógvan Jespersen um, at insend politisk tíðindi ikki verða kannað fyri sannleikavirði. Hetta hevur vant tíðindafólkini av við at gera journalistiskt arbeiði.

Tí kann væl hugsast, at útvarpið hevur fingið hesi tíðindi serverað grýtuklár, og so eru tey útvarpað í tí líki, sum tey eru móttikin. Og tíðindafólkini hava snøgt sagt ikki tímað at kanna málið, so tað kundi verið lýst í síni heild.

Kanska eru orsøkirnar báðar tvær, men úrslitið er ein tíðindaflutningur, sum grundleggjandi er partískur og harvið óálítandi.

### Opin spurningur til Jógvan á Lakjuni

Vit eru tó nøkur, sum spyrja okkum sjálvi, um ein slíkur tíðindaflutningur kann vera í samsvari við krøvini í kringvarpslógini um "sakliga og óhefta upplýsing". Vit vita, at tað nyttar einki at venda sær til kringvarpsstjóran. Samb. honum hava tíðindafólkini altíð rætt, og hann hevur eisini skipað fyri, at tey, sum finnast at út/kringvarpinum, koma at merkja hetta í tíðindaflutninginum, hóast tey hava fingið staðfest, at tey hava rætt. Her skal sigast, at vit kunnu tó ekkaleyst nýta okkara demokratiska rætt at finnast at, tí FF-blaðið hevur stórt sæð einki at missa.

Tí er einasti møguleiki at venda sær til landsstýrismannin, sum hevur politisku ábyrgdina av hesum tíðindaflutningi. Fyrispurningurin til Jógvan er hesin:

Er tann her umrøddi tíðindaflutningurin í samsvari við nevnda krav í kringsvarpslógini?

*Óli Jacobsen*

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 368 - 1. juni 2006



# Eiðisgentan sum gjørdist kommunistur 11 ára gomul!

Beint undan páskum vóru hjúnini Elin og Morten Jespersen í Føroyum. Tey hava verið í Føroyum nógvar ferðir og ætla eisini at koma aftur komandi ár. Morten er av føroyskari ætt. Abbi hansara, Laurits Hansen, var av Eiði. Tískil eigur hann systkinabørn hjá mammuni og trímenningar í Føroyum. Tað er blivið so væl millum hesar ættir, og tað er javnan samband.

Mortan hevur havt greinir her í blaðnum. M.a. skrivaði hann í 2003 eina drúgva frásøgn um abba sín og beiggjar hansara, sum allir blivu skiparar. Hendan greinin var í blaði nr. 289.

Mamma Morten, Ruth, var ein sjálvstøðugt hugsandi kvinna, sum var vinstrasinnað og limur í SF. Her helt hon í 1979 eina røðu, sum er ein stuttlig lýsing av eini gentu, sum argast um tey forrættindi pápi hennara hevur sum skipari. Vit endurgeva eitt brot úr hesi røðu, sum kundi blivið ein stuttligur partur í Eiðis søgu.



*"N.C.Monberg"*

Da jeg blev sådan ca. 10-11 år gik jeg over til at blive socialist. – Det var i 30'erne – tiden med den store arbejdsløshed. Jeg kan godt huske, at der stod en lang kø arbejdsløse hver dag på Gl. Kongevej i København. Der var nogle af mine skolekammerater, der gik i sko fra børnenes kontor, og en gang ugentlig blev de skuret rene med høvlspåner i skolens kælder af en arrig gammel satan, kaldet vaskemutter. Vi pæne børn var fritaget, vi havde jo bad hjemme, jo, der var forskel på folk.

## Munurin á skipara og matrósum

Men jeg blev altså socialist. Og det skete således. Min fader var kaptajn – ikke sådan en grim en med gevær og stå ret – næh – en kæk søkaptajn, og jeg tilbragte mange sommerferier på det skib han førte. Jeg så og oplevede meget – fremmede lande, stille og stormfulde dage på det hav, jeg elskede o.s.v.

Men én ting gjorde et meget stort indtryk på mig. Min fader beboede på skibet, som havde en besætning på ca. 25 mand, 2 kahytter. Der var en salon, sådan med mahogni, rødt plys og messingdørker, som messedrengen hver anden dag pudsede blanke. Min fader blev opvartet af hovmester Berg – en udmærket og pligttro mand som var kvartalsdranker. Kun én gang påførte han sig min faders vrede. Det var da han glemte, at selskabet, der ejede skibet, om sommeren inviterede gæster med som passagerer. Vi sad 10 mennesker fint til bords i alt plydset, og så kom Berg skidefuld med stive skridt. Han skred frem med fire stegte sild på det løftede fad. Han havde glemt, at kaptajnen ikke var alene. Herut i seng, og kokken fremtryllede en hastemiddag til 10.

Ja – sådan boede faderen. Styrmænd og maskinmestre, hovmester og kok havde hver en lille kahyt og spiste i en fælles messe. Forude, hvor bølgeslaget buldrer mod stævnen, boede fyrbødere og matroser – i 2 lukafer. Deres mad hentede de ved kabyssens dør i madspande. Deres nødtørft berettede de på en spand, som de skiftedes til at hive over bord. Skulle de tvættes rene, kunne de agterude hente en spand koldt vand, som under en hane i maskinrummet gav damp, så vandet blev varmt. Faderen havde et grønt badeværelse med



*Laurits*

kar o.s.v. – maskinmestre og styrmænd havde et fælles badeværelse. Men de forude havde altså faciliteter som beskrevet. Hver mand rådede kun over sin køje. Særligt indtryk gjorde en gammel hyggelig matros Brodersen på mig. Han var vel 55-60 år og havde tilbragt hele sin sejltid med en køje. På væggen var familiefotografier og det fælles lukaf havde træbord og bænke.

I øvrigt var forholdet mellem "den gamle" som min fader kaldtes og besætningen storartet. Vi børn fik lov til at deltage i alt hvad der foregår på et skib og blev forkælede af alle. Vi var vel en lille oplevelse i dagenes ensformige trommerom. Men jeg blev altså noget så forarget over at se den forskelsbehandling på et dansk skib. Jeg overfaldt min fader med anklager. Hvorfor skulle han bo sådan - og mændene forude sådan. Han var ikke særlig ophidset over min vrede. Han havde jo selv prøvet turen gennem graderne. Han var færing og var taget hjemmefra som 14 årig – sejlet med sejlskibe o.s.v. "Enhver er sin lykkes smed" udtalte han, men jeg var ikke tilfreds med den forklaring. Jeg blev som 11 årig kommunist.

## Agiteraðu fyri kommunistaflokkinum

Vi boede over for en skole, hvor valgene blev afholdt, og min bror og jeg udpønsede en plan! Da der skulle være valg fandt jeg en gammel, højrød kjole, som vi satte på et kosteskaft og hejsede ud over vor altan. Vi gik over til de mennesker, der gav børnene valgmateriale til uddeling. Vi gik til kommunisterne, og vi var så ivrige, at en journalist og en fotograf fik øje på os. Vi blev fotograferet og interviewet til Frederiksbergbladet. De spurgte, om det var vores forældre, som satte os i gang med uddelingen, ja ja ja ja. Faderen og moderen var medlem af den konservative vælgerforening på Frederiksberg. Vi fik ikke øretæver, det gjorde vi aldrig, men stemningen var lidt trykket et par dage efter det valg.

Jeg var i det hele taget en meget vild pige, og det blev bestemt, at det bedste for mig, sikkert var, at jeg, da jeg skulle i mellemskolen kom på pigeskole. Skolens rektor var en ældre meget striks dame. Men der var mellem lærerne nogle forunderlige mennesker. Vores historielærer havde været i Rusland og arbejdet som arbejder på fabrik.

## Í Spania beint undan borgarakrígnum

En lille parentes om min oplevelse lige før den spanske borgerkrig kan komme med. Jeg var i Bilbao, i Baskerlandet, med min fader. Byen ulmede af den kommende tids borgerkrigs stemning. Der var nogle passagerer med vort skib. De skulle selvfølgelig opleve Spanien. De tog i land og kom hjem til skibet fyldt med beretning om en eventyrlig landgang. De havde et sted i udkanten af bjergene fundet en kro, hvor der var en engelsk kok, som kunne stege svinekoteletter. Fængsling af Spaniensfrivillige fulgte senere.

Ruth doyði annars í 1981 í góðum árum.



*Elin og Mortan vóru eitt legg úti í Nólsoy, har Marner á Skúr var ferðaleiðari. Vakurt er í Nólsoy!*

# Tá skonnartin “Karen” fór á land í Leirvík

## Skiparin tók feil, teir kastaðu akker út fyri Leirvík og hildu seg vera komnar á Fuglafjørð

Í FF-blaðnum 20. apríl í ár var ein áhugaverd grein um skonnartina “Karen”, har John Lassen úr Klaksvík greiðir frá, hvat hann kann minnast, tá pápi hansara, Jóhannes Lassen, vanliga kallaður “amerikanarin”, sigldi við “Karen” út frá Klaksvík.

Fyri nøkrum árum síðani var undirritaði ein túr í Marstal og fór ein túr inn á gólvið á Sjósavninum, sum liggur niðri við havnina. Meðan eg gekk runt og hugdi at hesum sera áhugaverda sjósavni, steðgaði eg upp við eina mynd, har landslagið virkaði mær so kent. Á myndini sást ein strandaður skonnart og nøkur kavaklødd fjøll aftanfyri. Undir myndini stóð teksturin: Skonnarten “Karen” strandet på Færøerne.

“Karen” var ein donsk skonnart, sum í apríl mánaði 1916 kom til Føroyar við farmi. Hon var ein sokallað Marstal-skonnart. Áðrenn eg fór út av savninum, keypti eg ein lítlan bókling um Marstalskonnartirnar, og har fann



*Karen strandað út fyri Leirvík 16. apríl 1916. Aftanfyri sæst Borðoyggin við fjøllunum Hálgafelli og Háfjalli.*

eg nakað um “Karen”, sum eg haldi kundi verið vert at lagt afturat søgu hennara.

Skiparin á “Karen” var dani og kallaðist Mads Hansen Boye. Í bóklinginum stendur brot úr skipsdagbókini, har hann greiðir frá, hvat hendi umborð á “Karen” hin 16. apríl 1916:

“Klokken 8 formiddag: Peiler “Bordø-Næs” í NNV. Gisset afstand = 5kvartmil. Styrende kursen ind i fjorden ved “Gotaness”, skiftede kursen efter “Fuglefjod” til. Samtidig friskede vinden og var den gang storm af SV med regndis. Efter vi var passeret “Gotaness”, begyndte der at komme “fjeldkast”. Da skibet nærmede sig “Fuglefjord”, blev det regntykke og fjeldkastede så voldsomt, at vi måtte hale alle sejl ned og næsten ikke kunne manøvrere. Vi fik da en by at se, og formodede jeg, skibsføreren, at det var Fuglefjord. Gjorde da straks klar til at ankre, at det var umuligt at manøvrere med de voldsomme fjeldkast. Men samtidig med at ankeret kom i bund, da var klokken 10½, stødte skibet hårdt. Det viste sig, at det ikke var Fuglefjord, men Lervig, hvor skibet var, kort før det skete, havde vi ingen bund med loddet, og turde jeg heller ikke gå af dækket og se i kortene med det voldsomme vejr. Skibet stødte meg hårt og huggede slemt i grunden. Kl. 11 var der 7” ved pumpen. Klokken 11½ var der 24”, så skibet lækkede meget.

Der blev antaget otte mand fra land tillige med skibets mandskab til at pumpe, for hvis vi kunne holde den på pumperne, kunne skibet slæbes af grunden ved højvande. Men ved højvande, da skibet huggede meget i grunden, blev den mere læk, og vandet steg i rummet. Holdt pumperne gående til klokken 5½. Mandskabet begyndte så at tage deres tøj op for at bjærge det i land, men klokken 6 var der allerede så meget vand, at vi ikke kunne komme hverken i lukaf eller kahyt, så vi fik ikke alt vor tøj, og før vi gik fra borde, var vandet allerede inde på dækket.

Vinden var nu SSV storm og hårde fjeldkast. Klokken 3 om morgenen den 17. april gik mandskabet ombord igen og begyndte at bjærge alt, hvad der kunne bjærges. Der kan ikke arbejdes ombord ved højvande, da står hele agterdækket under vand.

Skipsdagbókin er undirskrivað av skiparanum H. M. Boye og stýrimanninum C. Rasmussen.

Sum áður nevnt var “Karen” tikin út aftur og gjørd í stand. Andrias Lützen, keypmaður í Klaksvík, keypti hana, meðan hon lá vrak. Í 1929 fekk hon motor og varð nýtt til fiskiskap í nøkur ár, men hon hóskaði ikki væl til snørisveiðu, tí hon var nógv grynri enn vanligu sluppirnar, og rak tí ov skjótt. Mestu tíðina varð hon nýtt til farmasigling.

*Hans Eli Hansen*
*Klaksvík*

---

## Kærunevndin hjá ALS:

# Kann koyra ommur til skips!

Tað er uttan iva skilagott, at ásett er fyri ALS, at alt landið er ein arbeiðsmarknaður, so arbeiðsleys skulu ikki kunna nokta at taka ávíst arbeiði, sjálvt um hetta førir við sær ferðing aftur og fram.

Men tað ber ikki til at gera so einfaldar og fýrakantaðar reglur uttan at skula taka nakað sum helst atlit til serligar umstøður. ALS hevur eina umsiting, sum skuldi havt høvd at hugsa við. Men í tann mun hetta ikki røkkur, hevur ALS eina kærunevnd, sum skal kunna meta aftur og fram, hvørt tað eru rímiligar orsøkir til, at viðkomandi ikki vil ella kann taka á seg ávíst arbeiði.

Fiskimannafelagið hevur ikki havt nógv mál fyri kærunevndina. Men vit hava júst havt eitt rættiliga prinsipielt mál.

Tað snúði seg um ein 61 ára gamlan mann, sum er arbeiðsleysur. Hann fær ávíst arbeiði umborð á einum frystilínubáti.

Viðkomandi ber seg undan. Hann heldur seg ikki hava fakligan førleika til at fara sum línumaður eftir at hava siglt sum kokkur í 25 ár.

Hetta tók ALS ikki atlit til og gav manninum karantenu í 4 vikur. Vit kærdu avgerðina og førdu fram:

1. Vit halda, at atlit má takast til aldur hjá viðkomandi, tá talan er um at ávísa fólk til fiskiskip. Tað er alment kent, at fiskimenn sum høvuðsreglu gevast at sigla, langt áðrenn teir koma til pensjónsaldur, og teir flestu eru longu givnir, tá teir eru 60. Hetta hevur samband við, at talan er um eitt krevjandi yrki at vera fiskimaður.

2. Afturat hesum kemur, at viðurskiftini við viðkomandi skipi vóru sera óskipað, bæði hvat inntøku og avrokningum viðvíkir, og hetta er kanska fremsta orsøkin til, at skipinum manglar fólk. Vit halda, at tað má vera eitt minstakrav við skipaðum viðurskiftum fyri at kunn “noyða” fólk til eitt arbeiði.

Seinni kundu vit útgreina fyri kærunevndin, hvussu skilið hevði verið við hesum skipi, sum t.d. við rúsevni. Úrslitið var, at skipið hevði ligið í fleiri mánaðir, tí eingin hevur viljað farið við skipinum. Tí hevði hetta kortini ikki verið eitt varandi arbeiði. Vit hilda ikki, at tað var neyðugt at fara í smálutir, men eftir okkara tykki bar ikki til at revsa fólk fyri ikki at taka ein slíkan kjans. Annars bjóðaðu vit kærunevndini at greina hetta nærri, men hetta hevði ikki áhuga.

Tann 3. apríl hevði Dimmalætting annars eina samrøðu við skiparan og reiðaran, sum undirbygdi okkara sjónarmið. Inntøkan umborð hevur eisini verið hareftir.

Vit gingu út frá, at limirnir í Kærunevndini innan almennu føroysku bløðini og hava tískil kunnað seg meira um hesi viðurskifti.

Hetta skuldi eisini sagt kærunevndini, at tað ikki hevur verið uttan grund, at føroyingar ikki hava viljað mannað júst hetta skip, tá teir hava kunnað mannað flest onnur skip í flotanum.

Tann, sum kennir tað minsta til skiparakstur, veit, at við einum slíkum rakstri er deyðin í durunum viðvíkjandi framhaldandi rakstur av skipinum.

Hóast hetta so staðfestir kærunevndin avgerðina hjá ALS um at geva manninum karantenu.

Tað áhugaverda er grundgevingin hjá Kærunevndini, har hon sigur:

*Kærunevndin skal tó viðmerkja, at nøkur viðurskifti kunnu í ávísum førum gera seg galdandi, soleiðis at viðkomandi ikki verður koyrdur í karantenu, hóast viðkomandi ikki tekur av ávístum arbeiði, herundir um viðkomandi ikki fær møtt vegna sjúku, ið kann staðfestast av læknaváttan, og um lønin fyri ávísta arbeiði er lægri enn sáttmálalønin fyri slíkt arbeiði.*

Hetta sigur í stuttum, at hjá kærunevndini finst stórt sæð eingin saklig grund fyri ikki at taka við ávístum arbeiði uttan at kunna vísa eina læknaváttan.

Aldur hevur einki at siga. Førleiki hevur einki at siga. Kærunevndin heldur eftir øllum at døma, at ein og hvør kann uttan víðari átaka sær eitt og hvørt arbeiði umborð á einum fiskiskipi! Tá kann tað heldur ikki gera nakran mun um tað er konufólk ella mannfólk.

Tað er eisini av týdningi, at skipið hevði als ikki verið í rakstri síðan 14.november 2005, tá skipið varð lagt med alla, tí fíggjarliga grundarlagið fyri framhaldandi rakstur var burtur og tað síðan er selt á tvang. Fiskimaðurin er ávístur kjans tann 23. desember. Hetta merkir, at hann er koyrdur í karantenu, tí hann ikki er farin við skipi, sum er lagt med alla ein mánað framman undan!

Okkara ávísing av óskipaðum viðurskiftum umborð á hesum skipi verður av kærunevndini avvíst sum “ógrundað uppáhald”.

Vit halda tað vera sera ósmæðið av kærunevndini at leggja FF undir “ógrundað uppáhald” í hesum máli. Er tað nakað sum ikki kann sigast um FF, so er tað at felagið førir seg fram við “ógrundaðum páhaldum”.

FF hevur tískil sent kærunevndini bræv, har vit spyrja um nevndin framvegis metir hesa støðutakan í hesum máli at vera bygda á røttum grundarlag ella um útgreiningin í hesi grein gevyr nevndini høvi til at taka málið upp aftur.

Hetta mál kemur fyri kærunevndina aftur í næstum. Tá svarið er komið vilja vit taka støðu til hvat ið tá fer at verða gjørt.

## Á vitjan í Scalloway:

# Fiskivinnufróðskaparsetur

Vit hava í teimum báðum undanfarnu bløðunum havt eina røð av frásagnum um vitjanina hjá fiskimannafelagnum í Hetlandi. Í hesi (fyribils) seinastu greinini verður farið til Scalloway, sum bert liggur 13 km frá Lerwick. Her búgva umleið 800 fólk. Fólkatalið í Scalloway er stórliga minkað síðani 1981, tá tey vóru 1.260 fólk. Her er ein havn og eitt sindur av fiskarí og annars teir hentleikar, sum hoyra til eina bygd av hesi støddini. Men av avgerandi týdningi er nærleikin við Lerwick - hagar tað bert er eitt hanagleiv við bili. Higar koma eisini ferðafólk, og Smyril Line hevur í mong ár leigað út summarhús til ferðafólk í Scalloway. Av egnum royndum kunnu vit siga, at hetta riggar heilt væl.



*Scalloway Castle*

Scalloway er eitt søguligt pláss. Hann var nevniliga fyrsti høvuðsstaðurin í Hetlandi. Toftin av einari gamlari borg, sum stendur mitt í býnum, minnir okkum á hetta. Borgin hevur eina sera dramatiska søgu, sum Christian Pløyen eisini sigur frá í bókini, hann skrivaði um ferð sína higar í 1839.

Pløyen lýsir Scalloway sum ein sera virknan bý við meira virksemi enn í øðrum tilsvarandi býum. Her var ein framúr góð havn. Her var stórt virksemi við fiskavirking, og her var eisini tunnuframleiðsla til ta stóru sildarvirkingina, sum var tá. Á tunnuvirkinum arbeiddu 12 sveinar. Pløyen var hugtikin av hesum virkna býi, og hann helt tað vera ein stóran sakn, at teir hentleikar, sum hann sá í Scalloway, ikki funnust í Føroyum.

### Jallurin hálshøgdur

Tann gamla borgin í Scalloway varð bygd av jallinum Patrick Stuart.

Hon var bygd umleið ár 1600, og endamálið við henni var, at jallurin skuldu kunna verja seg ímóti teimum forbitraðu hetlendingunum, sum hann ráddi yvir á ein sera harðrendan hátt. Borgin var ein stásilig íbúð hjá jallinum, tá sammett verður við smátturnar hjá teimum tá fátæku íbúgvarunum.

Jallurin noyddi hetlendingar at byggja borgina uttan at fáa ta minstu samsýning fyri hetta, og teir máttu eisini sjálvir gjalda fyri egnan kost. Skotholini í borgini siga eisini eitt sindur um tørvin hjá jallinum fyri at vera væl vardur.

Jallurin bað ein prest at finna eina hóskandi innskrift at seta á borgina. Hesin hevði øtast um harðskapin hjá jallinum móti fólkinum og mælti til skriftorðið um húsið, sum varð bygt á klett, og sum skal standa allar tíðir, mótvegis húsinum, sum var bygt á sand. Fyrst gjørdist jallurin í øðini, men so avgjørdi hann at ganga ímóti Gudi og menniskjum við at seta júst hetta skriftorðið á borgina.

Men borgin stóð ikki leingi. Skotski kongurin frætti um harðskapin hjá jallinum og sendi boð eftir honum at koma til Edinburgh. Her varð hann hálshøgdur í 1615.

Pløyen skrivar, at við tí ímyndini, sum borgin hevði fingið fyri at trælka íbúgvararnar, hevði eingin havt áhuga í at halda hana viðlíka. Tí forfall hon av tíðarinnar tonn, og nú standa bert múrarnir eftir sum eitt minni um "Patrick - tann ónda jallin."

### Shetland Bus

Vit hava fyrr greitt frá norðmonnum, sum flýddu til Føroyar undir seinna heimsbardaga - undan týskarum.

Norðmenn komu eisini til Hetlands undir krígnum, og Scalloway gjørdist miðstøðin fyri "The Shetland Bus", sum stendur fyri sambandinum, sum var millum norsku mótstøðurørsluni móti týskarum og Hetland. Higar komu teir, sum fóru úr Noregi til Bretlands, fyri hiðani at berjast móti týskarum. Søgan um hetta verður víst á Scalloway Museum, har ferðafólk eiga at fara at vitja, tá tey koma framvið.




*Her síggja vit setrið í síni heild. Teir flestu næmingarnir koma úr Skotlandi, nakrir eru eisini úr Englandi. Uttanfyri Bretlandi koma næmingar úr India, Afrika og nógvum smáoyggjasamfeløgum sum Seychellirnar, Tristian da Cunha og Falkslandsoyggjarnar. Eisini kom nakrir úr Danmark og Noreg, men enn hevur eingin verið úr Føroyum.*



*Peter Dryburgh, stjóri saman við Karl Isaksen.*

### Fiskivinnufróðskaparsetrið NAFC

Okkara ørindi í Scalloway vóru at vitja NAFC Marine Center. Nevndu bókstavir standa fyri North Atlantic Fisheries College, og hetta kann sigast at vera eitt slag av einum fiskivinnufróðskaparsetri.

Vit hava fyrr greitt frá um tann stóra oljugrunninum, sum hetlendingar eiga. Eitt av úrslitunum er júst NAFC, sum fyri ein stóran part er fíggjað við peningi úr oljugrunninum.

Vit hittu m.a. stjóran Peter Dryburgh, og teir vóru sera blíðir. Føroyska flaggið var eisini vundið í húnar hátt fyri at heilsa føroysku gestunum.

Tá komið verður inn í forhøllina, verða vit eisini mint um Føroyar. Her stendur nevniliga eitt modell av sluppini "William Martin", sum í síni tíð varð keypt til Føroya úr Hetlandi.

Í sambandi við vitjan okkara varð skipað fyri tveimum framløgum. Onnur var um sjálvt sentrið NAFC, og hin var um týdningin av fiskivinnuni fyri hetlendska samfelagið, sum vit annars hava lýst í undanfarnum bløðum.

Tað var ein samtøka av fiskivinnuáhugamálum í Hetlandi, sum í 1988 tók stig til at byggja NAFC, og høvuðsbygningurin var klárur at taka í nýtslu í 1992. Síðani hevur verið útbygt við fleiri bygningum - millum øðrum einum John Goodlad Centre í 2001, har tað eru undirvísingarhøli, starvsstovur og eitt nýtt bókasavn. Hetta má sigast at vera ein einastandandi varði at seta einum fiskimannafelagsmanni. Enntá meðan hann enn er á lívi.

### Visjónin

Teir, sum tóku hetta stig, høvdu eina visjón. Hon var at fáa ein altjóða fiskivinnumiðdepil á høgum stigi, sum skuldi kunna geva eitt íkast til stuðul og menning av eini burðardyggari fiskivinnu.

Endamálið skuldi vera á einum praktiskum støði at vera leiðandi innan skúlaskap, kanningar og menning á fiskivinnuøkinum. Í samstarvi við teir, sum eru í vinnuni, skuldi eggjast til eina vinnu, sum kundi fáa meira burtur úr, við minni kostnaði. Samstundis skal eisini verða hugsað um umhvørvið.

Stovnurin hevur eina leiðslu við 9 limum. 5 av teimum umboða politiska myndugleikan. Millum hesar er formaðurin í



*Setrið hevur sín egna fiskibát til sínar royndir.*



*William Martin: Hon byrjaði sína søgu í Hetlandi og hon endaði í Føroyum.*

Shetland Island Counsil, Sandy Cluness, ið - sum umrøtt - er ein íðin føroyavinur. Ein annar limur er Josie Simpson úr Whalsay, sum vit eisini umrøddu í frásøgnini, vit høvdu frá okkara vitjan á oynni.

Fýra limir eru valdir av fiski- og alivinnuni í Hetlandi. Eitt umboð er fyri fiskimannafelagið. Hetta ger sítt til, at tað er sera gott samstarv millum setrið og vinnuna. Her hava teir ásannað, hvussu týdningarmikið tað samstarvið er. Her kundu vit havt nakað nógv at lært.

### Uppgávurnar

Uppgávurnar hjá NAFC eru í høvuðsheitum:

**Navigatørútbúgving og venjing**

**Aling, útbúgving og venjing**

**At virka sum fiskimálaráð fyri Shetland Island Counsil**

**Fyriskipan av fiskivinnukanningum.** Hesar greiða vit frá seinni.

**Útbúgving og venjing til dekkarar og maskinmenn í handilsflotanum.** Hendan byrjaði í 2004 og er ein av 5 líknandi útbúgvingum í Bretlandi.

**Maskinútbúgving og venjing.**

**Handilsligar tænastur fyri alingina og fiskiskapin.** Hetta fevnir eisini um eina ráðgevingartænastu innan øll møgulig øki fyri veiðu, aling, umhvørvi o.l.

**Hava egna alistøð og matstovu.**

**Skipan av Shetland Food Innovation Centre.** Í fyrrverandi flakavirkinum á NAFC hava teir nú sett upp ein køk til at menna nýggjar fiskarættir, sum kunnu skapa nýggjar marknaðarmøguleikar fyri fiski. Hetta fevnir eisini um royktar fiskavørur.

### Stórt tal av næmingum

Sambært seinastu uppgerðini høvdu teir árliga 675 næmingar. Nógvir av hesum eru tó bert parttíð, so umroknað til fulltíðarnæmingar er talið 100. Talið av skeiðum er uml. 90, og er hetta í stóran mun somu skeið, sum vit hava á sjómansskúlanum. Í 2004 innihildu skeiðini 46 ymisk evni.



*Ian R Napier hevði framløgu um fiskivinnuna í Hetlandi.*

So løgið tað ljóðar, eru eingir føroyskir næmingar á skúlanum, hóast Hetland er okkara nærmasti granni og møguleikarnir at ferðast ímillum eru sera góðir. Sum tað skiltist høvdu føroyingar verið meira enn vælkomnir. Og nú fáa vit eisini flogsamband við Hetland.

Samlaða starvsfólkatalið, íroknað matstovuna, er 65. Næmingar frá NAFC kunnu - eftir ávísum fortreytum - fara undir framhaldslestur á øðrum lærustovnum í Skotlandi.

Uml. 70% av fíggingini er frá myndugleikunum í Hetlandi. Restin kemur frá ymiskum øðrum grunnum. Rakstrarkostnaðurin liggur um 40 mió. árliga. Nakað av inntøku er frá næmingagjaldi.

Trupulleikar eru við, at flokkarnir eru ov smáir, og at starvsfólkið hevur ov nógvar ymiskar uppgávur. Tað er eisini ein trupulleiki, at Scalloway er rættiliga fjarskotið. Tað eru fáir lokalir lesandi og hetta merkir, at flestu næmingar mugu nýta nógvan pening í flutningskostnaði.

Tær vinnur, sum NAFC veitir tænastur til, hava havt truplar umstøður í mong ár. Hetta merkist eisini á tilgongdini av næmingum. Tí hevur verið neyðugt at skerja virksemið hjá stovninum nakað.

### Kanningar

NAFC stendur fyri teimum fiskifrøðiligu kanningunum og royndarfiskiskapi, sum fara fram í Hetlandi.

Vit fara at nevna nakað av tí, sum er umrøtt í ársfrágreiðingini fyri 2004/5.

Ein verkætlan er at staðfesta støðuna á stovnunum á skeljafiski, sum hevur stóran týdning fyri útróðrarmenn. Her er fyrst og fremst talan um jákupsskel og krabbar. Hetta krevur innsavnan av royndum til kanningar, og í 2004 vóru tiknar royndir av 20.000 skeljafiskum. Umframt hetta eru tað logbøkur og tilíkt sum verður skrásett. Fyrstu úrslitini vórðu klár í 2005. Úrslitið var, at tað kundi kanska ikki sigast, at skeljarnar vóru ovveiddar, men tað er í hvussu er ikki grundarlag fyri størri roynd. Men allar slíkar kanningar skulu síggjast yvir eitt longri áramál, og tí halda kanningarnar fram.

Í 1997 byrjaði ein kanningarætlan viðv. havtasku saman við øðrum kanningarstovnum. Ein partur av hesum hevur verið at merkja havtasku. Royndirnar hava staðfest, at havtaska ferðast rættiliga víða. Havtaska, sum er merkt undir Hetlandi, er fingin aftur undir Føroyum og Íslandi. Havtaskan er ikki so dølsk, sum vit halda. Hesar kanningar halda eisini áfram.

NAFC er eisini við í teimum vanligu kanningunum av fiskastovnunum í Norðsjónum. Hetta arbeiðið fevnir eisini um eina kanning av sjónarmiðunum hjá sjálvum fiskimonnunum um støðuna hjá stovninum. Hetta tilfar er til stóra hjálp hjá fiskifrøðingum í teirra arbeiði. Tað hevur verið tann serliga ábyrgdin hjá NAFC at umsita júst hesa kanningina.

Eisini verða gjørdar royndir við at royna við snellu. Eftir øllum at døma hevur hetta ikki verið vanligur fiskiháttur á hesum leiðum. Men í samstarvi við Fiskimannafelagið í Hetlandi er gjørd ein royndarætlan, sum gongur í 20 mánaðir.

### 45 sløg av hvalspýggju

Umframt hetta eru eisini ymiskar kanningar í samband við alivinnuna. Aðrar kanningar eru viðvíkjandi hvalspýggju og algum. Hvalspýggja kann vera sera darvandi fyri alivinnuna, har hon tekur seg upp. Endamálið við kanningini er at staðfesta, hví tað knappliga kann vera so nógv hvalspýggja. Síðani skal kannast, um nakar møguleiki er fyri at forða fyri hvalspýggju.

Tað finnast nógv sløg av hvalspýggju. Á einum staði, Sandsound Voe, eru skrásett 45 sløg. Nøkur fá av teimum eru eitrandi. Eisini er staðfest, at eitt slag av hvalspýggju kann leggjast á stórar mongdir av kræklingi. Hvalspýggjuverkætlanin er fíggjað av Evropeiska Samveldinum.

Tað er eisini ein sama slag verkætlan viðvíkjandi algum.

Arbeitt verður eisini við kleking av ymiskum fiskasløgum, sum toski, hummara til útseting og kalva. Her arbeiða lesandi frá ymiskum londum.

### Góðskan á fiski

Ein verkætlan, sum byrjaði í 1999, hevur til endamáls at bøta um góðskuna á botnfiskinum, sum verður landaður. Roynt verður at skapa størri ans fyri góðsku á fiski. Hetta verður gjørt við regluligari vitjan á fiskamarknaðunum í Hetlandi, og góðskumetingar verða gjørdar. Hesar verða grundaðar á feskleika, hita í fiskinum og pakking. Síðan verður kunning um góðskuna á fiskinum sett á fiskakassarnar.

Umframt hetta verður eina ferð um ársfjórðingin sett upp ein uppgerð yvir gongdina í góðskuni.

Henda verkætlan er væl móttikin av veiðuliðinum, og alt bendir á, at henda innsavnan av data kann verða við til at hækka góðskuna á fiskinum. Hetta kundi vit kanska eisini lært av.

### Heilsufrøðislig starvsstova

Umframt hetta virkar NAFC sum ein heilsufrøðislig starvsstova, og her verða allar hugsandi kanningar gjørdar eins og í Føroyum.

Sum tað sæst, eru allar tær tænastur, sum vinnan kann hava brúk fyri, savnað á einum staði. Her er talan um eina miðsavning, sum uttan iva er ein fyrimunur fyri allar partar. Tað kundi verið trúligt, at hava nakað at læra her.

### Framtíðin

Teir á NAFC eru bjartskygdir viðvíkjandi framtíðini. Umstøðurnar eru tær bestu og starvsfólkið er framúr. Ein virkisætlan er gjørd fyri árini 2006-2009, og her sæst, at NAFC ætlar at spíla seg út á øllum økjum.

Undir øllum umstøðum var hetta ein sera áhugaverd vitjan. Tað ber til at fáa meira at vita við at fara inn á heimasíðuna: www.nafc.ac.uk

Undir øllum umstøðum var tað spennandi at síggja hendan fjølbroytta stovnin, sum vit eiga at hava samband við.

# Ferðalagið hjá Pløyen

Tá Pløyen fór til Hetlands, hevði hann tríggjar føroyingar við sær. Um hesar skrivar hann:

Til Ledsagere havde jeg valgt Odelsbonden Poul Joensen af Ejde, Kirkeværge og Dannebrogsmand, en udmærket Mand, oplyst og fri for Fordomme, og, skjøndt han er over 60 Aar, dog endnu rask, kraftfuld og livlig, samt Odelsmand Poul Joensen af Nolsøe, ligeledes en opvakt, driftig Mand, dertil en dygting Fisker og en af Landets bedste Baadebyggere. Desuden anmodede en ung Bonde og Odelsejer her paa Øerne, Mourits Mohr, som eier nogen formue, mig om at maatte ledsage mig paa sin egen Bekostning, en Begjering som jeg med den største Fornøjelse opfyldte, da en af de store Mangler blandt Færinger er, at de ikke have det ringeste Begreb om den Verden, som de, ved den her bestaaende Enehandel, ere afsondrede fra, og derfor ofte ansee deres lille Verden for at være fuldkommen, ikke at kunne modtage nogen Forbedring.

Tað er nokkso nógv skrivað um hesar tríggjar menninar, og tí kann tað vera á eini leið at lýsa teir betri. Sigast kann um teir allar, at teir hava verið framburðsmenn og á nógvum økjum frammanfyri sína tíð.

### Pól á Látrinum

Um Poul Joensen á Látrinum, á Eiði, skrivar Hans Marius Debes í bókini "Søgur um gomlum døgum" m.a.:

Hús hansara á Eiði vóru ein rættilig borg, sum tað sæst enn í dag, har tað nú er Fornminnissavn. Her var so hábærsligt, sum Hans Marius tók til.

Hans Marius Debes kendi dóttir Pløyen. Hon greiddi honum frá, at mamma hennara doyði, tá hon var 6 ára gomul. Hvørt ár fóru tey norður til Eiðis við amtmansbátinum - 10 mans til róðrar og Dannebrog í stavn. Húsini hjá Pól vóru tá ein borg í mun til amtmanshúsini tá. Og her nutu tey allan hugsandi blíðskap.

Her vóru eisini aðrir fínir gestir. Í 1844 kom Fríðrikkur Sjeyndi sum krúnprinsur til Føroya. Hann skuldi upp á Slættaratind, og hann kom tá at gista á Látrinum nakrar dagar, meðan bíðað varð eftir líkindum.

Poul kom seinni aftur til Keypmannahavnar, og tá vitjaði hann Fríðrik, sum nú var blivin kongur, og Fríðrikkur kallaði Poul sín vin. Tað var annars Fríðrik, sum gav dønum grundlógini í 1849 eftir trýsti frá konu síni, grevinde Danner.

Poul var á mongum økjum ein framburðsmaður. Eina ferð, hann kom úr Danmark, hevði hann tvey svín við sær. Men hetta riggaði ikki væl, tí hann slepti svínini millum seyðin, og tey duttu eisini oman í Eiðiskolli.

Pól doyði í 1856.

### Poul í Búð

Nólsoyingurin Egon Hansen hevur í Varðanum skrivað eina grein um Poul Joensen og hansara ætt.

Poul Joensen, í Búð, var sonur Jógvan, beiggja Nólsoyar Páll. Hann var føddur í 1791 og var útbúgvin snikkari í Danmark. Í Danmark gjørdist hann kendur fyri sína kvøðing, sum tað eisini kom til sjóndar í tátíðar kvæðabókum.

Í 1834 var Tillisch amtmaður, og hann var eisini ein kveikjari eins og Pløyen. Hann stovnaði saman við m.ø. Poul í Búð eitt partafelag, ið skuldi fara undir at smíða bátar, sum høvdu dekk bæði framman og aftan.

Poul smíðaði bátin, og tá hann var liðugur í 1836, var hann blivin til eina skonnart, ið fekk navnið "Nolsøe". Hon lastaði 17 tons, og sigldi fyri tað mesta við farmi innanoyggja. Skipið gjørdist vrak í 1841.

Í 1836 fór Poul saman við trimum øðrum nólsoyingum at leggja inn Tjørnunes, sum liggur ein fjórðing sunnanfyri bygdina. Teir førdu neytatøð við 8-mannaførum suður hagar. Tey vóru blandað við tara, teir skóru á staðnum. Her varð korn dyrkað inn í 20. øld.

Í 1845 taka nólsoyingar aftur stig til at byggja skip, tað triðja av fýra. Undangongumaðurin her er aftur Poul í Búð. Poul skrivar til Pløyen um loyvi at innflyta fraktfrítt tilfar til eitt skip, ið skal byggjast í Nólsoy. Skipið fekk navnið "Haabet" ella "Friheds Haab".

Poul bygdi snikkaraverkstað í Nólsoy, og hann var við til at byggja Kollafjarðar kirkju í 1837 og Kvívíkar kirkju í 1938, og har hann gjørdi vindeyguni, sum eru bogað í erva og hava eitt serligt snið.

Hann hevur eisini evnað krusifiksið, sum stendur á altarinum í kirkjuni í Nólsoy, og hann hevði sera vakra songrødd.

Millum hansara eftirkomarar eru tey sum eita Kjælnes, og Todi Jónsson.

### Mourits Mohr

Tað er skrivað um Mourits í Varðanum bind 31. Hann var sonur Peder Mohr og Elisabeth Mariane Hammershaimb. Tann kendi vísindamaðurin Nicolaj Mohr var abbi hansara.

Pápin doyði longu í 1831, tá Mourits var 11 ára gamal. Mourits festi í 1837, bert 16 ára gamal, og hann má hava verið ein sera sjáldsamur drongur, tá hann ikki 19 ára gamal sjálvboðin og fyri egnan kostnað fer hendan túrin við Pløyen.

Mourits man hava verið tann fyrsti, sum royndi línuna, sum gav ferðalagnum ein slíkan íblástur. Tá hann kom aftur av hesi ferðini, fór hann at royna línufiskiskap og settu kalvalínu frá lendingini á Hólminum. Hann ringdi hana um Hólmasund og fekk 4 kalvar á. Men føroyingar vóru konservativir, og tað var nógv mótstøða móti línuni fyrstu nógvu árini, tí hon var søgd at oyða fiskastovnarnar! Tað gingu nógv ár, áðrenn hon varð viðurkend.

Mourits var bert 37 ár, tá hann doyði, so hann fekk ikki roynt seg til fulnar. Vit kunnu tó siga, at børnini hjá Mourits royndu at taka upp nakað av tí, sum hetlendingar gjørdu.

Í staðin fyri at sláa seg til tols við at fáa tveir oksar um árið í leigu av Tindhólmi, settu brøðurnir jørðina í veð fyri at fáa eina slupp. Tíverri gekk hon burtur fyrsta árið, og Tindhólmur reyk. Áræðið høvdu teir, og abbasonurin, Kjartan Mohr, hevði tað tí ikki frá fremmandum, tá hann stovnaði fyritøkuna Tórshavnar Skipasmiðju.

Meðan Mourits var bóndi, var Hvítanes bygd í 1837 og settust 6 mans niður her, fimm úr Kollafirði og ein úr Lamba. Pløyen amtmaður fekk hesa niðurseting í lag, og skuldi hon hava týdning fyri flutning inn í Eysturoynna og Sundalagið, tá ikki viðraði at fara um Hólmin. Stórur og lítil bátur vórðu latnir hvítanesmonnum til hesa nýtslu. Eisini var vanligt, at bátar settu upp á Hvítanesi.

Mourits doyði í 1857 av lungnabruna aftaná várfjall. Hann hevði sitið hvítklæddur og roytt eftir at vera komin sveittur og heitur á rætt. Tá var hann bert 37 ára gamal, og eftir hann sótu konan og 10 børn. Eftir hann stýrdi konan Marin garðinum. Hon var hildin at vera dugandi bóndakona, ið hevði stak góði evni til at stíla fyri øllum arbeiði bæði innan og uttandura. Hon lat vegin, ið liggur gjøgnum bygdina, leggja.

Hann liggur grivin beint við Dómkirkjuna, so vit á Fiskimannafelagnum síggja yvir á hansara grøv.

Annars var ættarmót fyri eftirkomarar hansara fyri nøkrum fáum árum síðani, og tá vísti ættartalvan, at hann hevði einar 900 eftirkomarar.



*Poul á Látrinum, f. 1. mai 1778, d. 1851. Málningurin er frá tá hann er á ferð heim frá vitjan hjá kongi.*



*Monrad Kjælnes, skrivarin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, er ein av eftirkomarunum hjá Poul í Búð.*




*Grøvin hjá Mouritz Mohr er næsti granni hjá Fiskimannafelagnum. Hann er jarðaður beint við gáttina á Havnar Kirkju.*

Nikal 2. partur:

# Sluppu ikki at giftast fyrr enn sjúklingagjaldið var goldið!

At taka úr blaðnum

Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum

Í fyrra partinum av frásøgnini hjá Nikael segði hann frá síni søgu sum tuberklasjúklingur. Í hesum partinum fer hann aftur niðan í Hoydalar, men nú er tað at arbeiða sum húsavørður, sum vit vildu sagt í dag. Í hesum verður eisini sagt frá øðrum í sambandi við tuberklasjúkuna, m.a. verður komið inn á umstøðurnar hjá teimum, sum sótu heima. Vit fáa eisini at vita, at tað kundi gerast tvørligt hjá tuberklasjúklingi at sleppa at giftast.



*Nikal saman við døtrunum. F.v. Súsanna, Anna og Sølva.*



*Nikal saman við systkjunum. Frida, 88 ár, Nikal 90 og Símun 85 ár.*

### Portørur á hospitalinum

Teir søkja so einaferð eftir einum portøri til hospitalið, og eg helt, at eg skuldi søkja tað arbeiði. Eg kendi væl Jóhannes Nolsøe, sum var inspektørur tá, og eg fekk so hetta arbeiðið. Hetta hevur verið umleið í 1941. Vit vóru tveir portørar - Sofus Poulsen og eg.

Ansgar Jensen hevði verið portørur frammanundan, men hann var farin. Arbeiði sum portørur fevndi um alt møguligt. Umframt at vera portørar skuldi vit eisini taka okkum av umvælingararbeiði, sum tørvur var á, og tað kundi til tíðir vera heilt nógv. Magnus Samuelsen var tá annar ketilpassarin.

Hinir vóru fastbúgvandi í Havn og fóru heim aftan á vanliga arbeiðstíð, og tá var eg einsamallur eftir. Eg búði á hospitalinum - niðri undir vaskarínum. Har var ein verkstaður og ein lítil stova, sum portørarnir plagdu at halda til í. Har svav eg, og tað vóru ofta boð send eftir mær um náttina. Nakað seinni kom ein portørur afturat, Martin Djurhuus, tí ikki var hildið ráðiligt, at eingin portørur var í húsinum, tá t.d. sjúkrabilurin skuldi eftir sjúklingi.

Dr. Dahl var einsamallur skurðlækni tá. Kommunulæknarnir í Havn plagdu eisini at arbeiða á hospitalinum. Eg havi ofta hugsa um, at tað er stórur munur á. Nú eru nógvir læknar - kanska einir 50. Dr. Dahl átti ein lítlan bil, men hann hevði ikki koyrikort. Kona hansara - Hildigarð - hevði koyrikort, men henni dámdi ikki at koyra, so eg plagdi at vera privatsjaførur hjá honum. Eg minnist einaferð, at Dahl gjørdist illa sjúkur. Tá kom ein serlækni úr Onglandi, sum skuldi hyggja upp á hann. Men meðan Dahl var sjúkur, mátti hann framvegis virka sum lækni. Hann var jú so "óumveruligur".

Eg minnist eisini dr. Stærmose, sum var umrøddur her í blaðnum fyri kortum í frásøgn hjá Sofusi Poulsen. Hann giftist við eini føroyskari konu Helenu Enniberg, og hann plagdi onkuntíð at loysa Dahl av.

### Niðan í Hoydalar

Í 1943 fór eg niðan í Hoydalar. Jóhannes Nolsøe bað meg søkja, tí gamli umsjónarmaðurin - Dánjal Hoydal - skuldi leggja frá sær fyri aldur. Lønin var 200 kr. um mánaðin umframt hús og brenni.

Umsóknin skuldi sendast løgtingsskrivstovuni. Tað var ein 5-manna løgtingsnevnd, sum hevði ábyrgdina av Sanatoriinum, og sum eisini setti fólk í starv. Vit vóru einir 8 ella 9, sum søktu. So varð stemmað og eg fekk tríggjar atkvøður. Ein annar umsøkjari fekk tvær. Eg byrjaði í starvinum 1. mai 1943. Eg kendi væl Dánjal Hoydal, sum var pápi Karsten Hoydal. Eg hevði verið sjúklingur tvær ferðir har uppi, og vit arbeiddu saman eina tíð, so hann kundi seta meg inn í arbeiðið.

Á sanatoriinum var sentralvarmi við dampi. Men ketilin varð sløktur hvørt kvøld, og so máttu vit kyka aftur um morgunin. Brennið vit brúktu var koks og kol, og tað var nógv stríð av tí. Men so fór eg at royna at lata ketilin ganga alla tíðina. Fyrstu næturnar mátti eg upp at hyggja eftir, um ketilin kókaði tómur, men hetta bilaði ikki. Hetta lætti sera nógv um.

Eg skuldi eitast at vera maskinmaður, men arbeiðið fevndi um alt møguligt. Eg var eisini handverkari í húsinum. Gøtur, gongubreytir og kloakkir skuldu haldast. Harafturat skuldi eg røkja urtagarðin, passað høsnini, hjálpa at fáa matin til sættis, kryvja fisk, hagreiða grind, fletta seyð og neyt, og til jóla - royta gæs.

Og so vóru eisini heilt serligar uppgávur. Einaferð skuldi Magnussen hjálpa einum djóragarði í Danmark at fáa nakrar súlur. Tær fekk hann úr Mykinesi, áðrenn tær vóru floygdar. Tær gingu so í Hoydølum, til tær vórðu sendar til Danmarkar.

Annars kendu øll seg sum eina familju í Hoydølum, og her var gott samanhald, eisini millum sjúklingar og starvsfólk.

Eg var einsamallur í starvinum at byrja við. Men eina ferð undir krígnum kom ein dani, Kaj Skov Jørgensen, eisini at starvast her. Hann var komin í land í Føroyum av onkrum donskum skipi. Nakað eftir krígslok fór hann aftur til Danmarkar. Eftir hann varð Carl Poulsen úr Havn settur í starv saman við mær. Carl var giftur við økonomuni á Sanatorium - Linu Poulsen, og tey fluttu niðan á Hvítanes, tá tey fóru úr Hoydølum. Tá Carl fór, kom Arne, sum var sonur gamla Hoydal. Arne Hoydal var so lagaligur. Skuldi eg onkustaðni, so vildi hann altíð taka yvir.

### Nógv samband við sjúklingarnar

Tað fyrstu tíðina vóru húsini full av sjúklingum, eins og TB, sum var ein partur av hospitalinum eisini var fult. Tað kundu vera 53 sjúklingar í Hoydølum. Hetta vóru ofta menn upp á sítt frægasta. Serliga vóru útoyggjarnar væl umboðaðar, t.d. Skúvoy, Mykines, Fugloy og Svínoy.

Eg hevði nógv samband við sjúklingarnar. Á sanatoriinum var ein verkstaður, har sjúklingarnir gjørdu ymiskar skreytlutir úr hvalatonn og ymiskt úr træi: skip, bátar, dukkuhús og mangt annað. Royndirnar her skaptu ofta monnum møguleika at fáa livibreyð aftan á, at teir vóru slopnir av sanatoriinum.

Eisini var ymiskt til ítrív. Tey spældu kort, telvaðu, spældu bobb og billiard, so tað var altíð okkurt á skránni. Ofta var eg tøkur, tá tað manglaði ein makkari til kortspæl.

Eg kann ikki siga, at eg vanliga kendi meg nívdan í Hoydølum. Sjúklingarnir dugdu væl at bera seg. Teir vóru ofta í góðum lag og høvdu okkurt at takast við. Onkrir vóru tunglyntur, meðan aðrir vóru lættsintir.

Eg hugnaði mær ofta saman við sjúklingunum, og tá onkur gjørdist frískur, frøddust vit øll, og onkur streyk eitt tár og ynskti, at tað var hann, sum varð vorðin frískur.

Sjúklingarnir høvdu eitt felag, sum eina ferð árliga fekk loyvi at selja lutaseðlar. Teir plagdu at venda sær til handlar um at stuðla við onkrum gávum. Men flestu lutirnar gjørdu teir sjálvir. Menninir gjørdu lutirnar á verkstaðnum, og kvinnurnar bundu, heklaðu, seymaðu og broderaðu. Har var mangt vakurt plaggið gjørt, og lutaseðlarnir gingu "sum heitt breyð". Peningurin fyri søluna varð settur í Sparikassan. Ein ávís upphædd varð tikin út til høgtíðir og býtt út til sjúklingarnar. Sigurd Berghamar var formaður í sjúklingafelagnum í fleiri ár.

Sjúklingarnir skuldu sjálvir halda seg við øllum klæðum, tó ikki seingjarklæðum. Klæðini vórðu vaskað eina ferð um vikuna úti á hospitalinum.

Starvsfólkini á sanatoriinum vóru:

1 yvirlækni við hjálp frá kommunulækna í Havn í viðtalutíðini.

Aftaná kríggið var ein fastur lækni settur afturat.

1 yvirsjúkrasystir, 1 deildarsjúkrasystir og 2 assistentar.

1 skrivari á Tuberklastøðini, seinni blivu tveir.

6 gongsgentur, 7 fólk í køkinum, 1 økonoma, 1 assistentur og 3 køksgentur.

### Kundi ikki gloyma røddina frá operatiónini!

Í 1944 giftist eg við Jóhonnu Sofíu úr Vestmanna. Hon byrjaði í 1937 sum sjúkrasystranæmingur og var liðug í 1940. Vit komu at kennast, tá eg var innlagdur á hospitalinum. Tá eg varð opereraður fyri blindtarmsbruna, var hon á operatiónsstovuni, og hon helt í hondina á mær. Eg helt, at hon hevði

*Framhald á næstu síðu*

*Frá vinstru: ókend kvinna, Torleif Kruse av Eiði. Hann doyði av tuberklum tíðliga í tíðini. Hann varð giftur við Ester Kruse jarðamóðir. Síðani Hans Sumberg úr Vági, verfaðir yngstu Sølvu hjá Nikael. Karin Reinert úr Skopun. Frits Thomsen, Gøtu beint aftanfyri. Hann var annars systkinabarn Hildigarð, sum er umrødd í greinini Guðrun Lützen úr Havn, systur til Esther Djurhuus, tannlækna. Vit kenna ikki mannin uttan t.h.*





*Nikal til arbeiðis á sanatoriinum.*

so vakra rødd, so hon fór ikki frá mær.

So kom eg aftur at arbeiða sum portørur á hospitalinum, og tá fóru vit at koma saman. Hon kendi eisini til tuberklarnar, tí systir hennara var deyð av tuberklum.

Fyri at fáa starv sum sjúkrasystur var neyðugt at fáa autorisatión frá Sundhedsministeriet. Men í 1940 varð einki samband til Danmarkar, og tí bar hetta ikki til. So hon starvaðist uttan autorisatión tey 4 árini, til vit giftust. Vit fingu trý børn í fýra ár, og var hon heima hesa tíðina.

Tá hon so byrjaði aftur at arbeiða fyrst í 50-unum, søkti hon Sundhedsministeriet um at fáa autorisatión. Hon fekk tað svar aftur, at hon skuldi fara tríggjar mánaðir á ymiskar deildir á hospitalinum. Hon hevði verið sum næmingur á TB, hon hevði verið assistentur á skurðdeildini, og so var hon yvirsjúkrasystir á niðaru gongd. So hon leyk longu hesar treytir. Hon fekk so pappírini og byrjaði at arbeiða á sanatoriinum.

## Ræddust ikki tuberklarnar

Seinast í 40-unum og fyrst í 50-unum byrjaði tað at minka við tuberklunum.

Tá var tað eisini at vaksinan kom. Tað vóru nógv, sum komu á økið hjá sanatoriinum, men tað løgna var, at eingin bleiv sjúkur. Her hevur tað eisini havt sín týdning, at tey, sum arbeiddu á sanatoriinum, skuldu hava pluss, sum merkti, at andevni longu var í kroppinum. Okkara børn vórðu t.d. ikki smittað, og vit tóku eingi serlig tiltøk.

Roknað varð við, at tað vóru teir ringastu sjúklingarnar, sum vóru á TB, og teir frægastu vóru eftir á sanatoriinum.

Sjúklingarnir fingu nokk so ofta vitjan, og havnarfólk fóru ofta spákingartúr framvið sanatoriinum. Her var jú vegur - eisini oman á Boðanesi. Tað var eisini hugaligt hjá sjúklingunum at síggja fólk ganga framvið uttan at ræðast.

Ofta var tó dapurt. Magnussen visti um, at eina ferð stóðu trý undir børu í senn.

Eg minnist eisini væl Mikkjal á Ryggi, sum doyði í Hoydølum. Hann var tvær ferðir sjúklingur á sanatoriinum, og hann var heima ímillum. Hann gjørdist nakað gloymskur móti endanum. Tað vóru nógv, sum vitjaðu hann, men aftan á plagdi hann at spyrja: "Hvør var hasin sum vitjaði." Hann hevði Fuglabókina við sær og plagdi at tekna fuglar.

## Persónlig og sosial viðurskifti

Nikael var ikki forsyrgari, meðan hann var sjúkur. Fyri at fáa greiðu á sosialu umstøðunum hjá familjumonnum við tuberklum, hava vit eisini tosað við tað 86 ára gomlu Hildigarð hjá Líggjasi á Fløttinum í Syðrugøtu. Hon var gift við Jóan Jakku hjá Jóhannes Jakku við Gøtugjógv. Jóan Jakku gjørdist sjúkur av tuberklum í 1944. Tá lá hann á Sanatoriinum í 4 ár út í eitt. Síðani var hann heima í fýra mánaðir og varð so lagdur inn aftur í 1948 í 2 ár. Hann hevði fyrst tuberklar á øðrum lunganum, og síðan í hinum. Hann fekk umrøddu skurðviðgerðina við flyting av rivjabeinunum fyri at leggja sjúka lunga stilt.

Persónliga var hetta ikki lætt. Tey vóru nýgift og áttu eitt lítlan son - Ásmund. Jóan Jakku slapp ikki heim eina einastu ferð, meðan hann varð innlagdur burtursæð frá umrøddu 4 mánaðunum. Sjúkrapeningur var tað nærum einki sum æt. Hildigarð fekk 38 kr. um árfjórðingin. Um hetta skal sammetast við nútíðarvirði, kann upphæddin faldast við 30. Men sjálvt tá er talan um eina sera lítla upphædd.

Tí mátti Hildigarð royna at forvinna til lívsins uppihald. Hetta gjørdi hon m.a. við at vaska fisk og at vaska skúlan. Fyri at vaska skúlan fekk hon 50 kr. um mánaðin, sum var tann einasta fasta lønarinntøkan í húsinum. Fiskaarbeiði var komandi og farandi.

Skuldi hon til Havnar kostaði hetta 25 kr., tí bilur mátti jú takast niðan á sanatoriið og oman aftur. Hildigarð leggur tó dent á, at tey ongantíð komu í skuld. Væl hevur verið húsast.



*Vit kenna hesar persónar: Uttast høgru megin er Jóan Jacob við Gøtugjógv, sum er umrøddur í greinini. Nr. 3 høgrumegin frá er Hannefía f. Hansen úr Gøtugjógv. Systir hennara Ólfríða er uttast t.v. í fremstu røð. Tær eru í sama slag troyggjum. Nr. 4 frá vinstru er Eyðolvur Mikkelsen, úr Havn, Tann myrkhærda sjúkrasysturin halda vit vera Clemmu Johannesen. Kvinnan beint aftanfyri Eyðolv er Anna Kristoffersen úr Vestmanna. Í triðja raðnum uttast til vinstru stendur Steingrím Mikkelsen, í ljósari troyggju. Hann og Eyðolvur vóru brøður. Maðurin nr 2 frá vinstru í aftasta raðnum er Niels Joensen úr Hvannasundi. Gentan sum stendur høgru megin hann kallaðist Sissal, úr Skopun, var gongsgenta og hon giftist Vilhelmsen. Vit vilja fegin frætta frá teimum sum kenna onnur á hesum myndum.*



*Nikal og Hannefía.*



*Her hava teir verið á seiðabergi. Jóan Jakku uttast t.h.*

Sjúklingarnir kundu forvinna eitt sindur við tí ítrivi, teir lærdu at gera. Jóan Jakku hevði lært eitt sindur at forsolla hjá sváginum, Jakku skómakaranum. Hann kundi forvinna nakað við at forsolla fyri hinar sjúklingarnar, men tað var eisini avmarkað, hvussu nógv teir høvdu ráð til.

Hildigarð kundi annars ekkaleys vitja Jóan Jakku, tí hon var positiv og var vard ímóti smittu. Hon hevði sum ung verið arbeiðskona í einum húsi við tuberklasjúklingi. Hvørja ferð hesin spýði blóð á gólvið, varð Hildigarð sett at turka tað upp. Men hetta gjørdi, at hon fekk smittuna uttan at gerast sjúk.

Tað var eitt sjúklingagjald, sum skuldi gjaldast fyri at vera innlagdur, og tað var um eina krónu um dagin. Hetta rindaði sjúkrakassin fyri sínar limir. Hjá teimum, sum ikki vóru limir í sjúkrakassa, hendi tað, at kommunan mátti leggja út uppá at fáa peningin inn aftur. So leingi ein skyldaði kommununi fyri hetta gjaldi, misti viðkomandi borgarlig rættindi. T.d. var tað onkur, sum ikki slapp at giftast, so leingi skuldin ikki var goldin.

Jóan Jakku kom fyri seg aftur, orkaði at gera alt arbeiði og náddi høgan aldur. Hildigarð eigur fleiri av teimum myndunum, sum eru til hesa greinina

## Jóhanna Sofía greiðir frá:

Ein kelda til hesa grein er samrøða, sum Helena Samuelsen hevði við hjúnini í 1995, og sum var prentað í Dagblaðnum.

Hannefía, sum hon vanliga varð nevnd, greiddi frá, hvussu tíðarkrevjandi tað kundi vera, tá skipsmanningar komu niðan til kanningar, tí teir komu so pø á pø allan dagin. Men tá ið Óli Arge hevði fingið bussin, var hann næstan altíð á keiini, tá skipini komu á Havnina, og so komu allir niðan í senn. Skipini vóru tá á veg avstað á túr. Og tá var tað tungt, um onkur fekk at vita í røntguni, at hann var sjúkur, og tað hendi, at hann ikki slapp oman aftur, men varð innlagdur.

Her kann skoytast upp í, at tá Hjálpargrunnurin fyri Óarbeiðsførar Fiskimenn varð settur á stovn í 1938, var tað júst fyri at hjálpa í slíkum førum. Georg L. Samuelsen, sum var formaður í grunninum í mong ár, greiddi frá, at hann hevði skrivað eina oddagrein í Dimmalætting um júst hetta mál. Tá tók lærarafelagið stig til at stovna umrødda grunn við at lata fyrsta innskotið. Tað kann eisini verða nevnt, at seinni varð tryggjað fiskimonnum í hesi støðu sjúkraviðbót frá lønjavningargrunninum.

Hannefía upplivdi saman við Nikael ta stóru kollveltingina við vaksinu móti tuberklum. Talið á

Framhald á síðu 15

# Til minnis um Onnu hjá Jakku skómakaranum



*Anna á yngri árum.*

Tá deyðsboðini av Onnu hjá Jakku skómakaranum komu næstseinasta mánadag, flugu minnini aftur til Gøtu skúla í 1951. Sjálvur var eg innskrivaður at fara í skúla í Keypmannahavn í 1950. Men so verður avgerðin tikin um at flyta heim sama heyst. Sjálvur dugdi eg ikki eitt føroyskt orð, so tað at byrja at ganga í skúla varð útsett til eftir páskir 1951, tá vanliga skúlaárið byrjaði tá í tíðini. Minnist framvegis fyrsta skúladag. Fyrsti setningur var at læra at skriva 1 tøl. Hetta gekk rímiliga væl, ikki minst við hjálp av nýinnkeyptu linealini. Men verri var, tá vit skuldu læra at skriva 2 tøl og ikki minni við 3 tølunum. Tá gekk tað rættiliga upp fyri einum, hvussu nógv ið stóð fyri framman!

Vit byrjaðu í gamla skúlanum frá seinast í 19. øld. Her húsaðust teir yngru flokkarnir, og Helga Øregaard var lærarinna. Hóast Pisa-kanningar ikki vóru uppfunnar og hóast ongar próvtøkur og royndir vóru, so kann sigast, at vit lærdu væl og virðiliga at lesa og at skilja tað, vit lósu, og nógv afturat. Vit fingu øll ment okkara egnu evni, sum vit kláraðu okkum við fram í lívinum.

Skúlastovan var neyvan nakað broytt, síðan hesin gamli skúlin var nýbygdur. Har stóðu tvey røð av borðum, og tey vóru so breið, at tríggir næmingar sótu við hvørt borðið. Eitt hol var í borðinum til blekkhúsið var fyri hvønn næming. Tá vit skuldu skriva, vórðu blekkgløsini sett í holini, blekk fylt í, og so settu vit skeiva penn í pennaskaftið. Tað spruttaði ofta illa, men so nýttu vit "trekkpappír" at turka tað upp aftur við.

Helst munnu onkrir trupulleiki hava staðist av, hvar næmingarnir skuldu sita sum ofta er í skúlaflokkum. Onkur vildi sita saman og onnur vildu ikki seta saman, so "lærarinnan" ásetti næmingunum, at teir skuldu sita eftir aldri - uttan mun til kyn.

Anna fylti 10. august, sjálvur fylti eg 21. august og Jonhard hjá Hans David á Skansa fylti 12. september. Hetta avgjørdi so, hvør skuldi sita við aftasta borðið í fyrstu røð, og eg kom at sita millum Onnu og Jonhard, sum seinni gjørdist svágur mín.

Soleiðis komu vit bæði Anna at kennast so væl sum vit gjørdu. Nú fór hon og Jonhard doyði í 2001, so nú eri eg einsamallur eftir á beinkinum!

Frammanfyri okkum sótu Eyðgerð hjá Anthon, Anna hjá Niklasi og Finnur hjá Høgna. Finnur náddi júst at gerast seksti ár, so fór hann. Nakað frammanfyri sat Eivind hjá Heina. Hann gjørdist um 50 ár.

Á fremsta beinki í aðru røð sótu Andrass hjá Suðring, Knút hjá Katu og Líggjas hjá Sámal Petur í Køkinum. Av teimum trimum eru bert Andrass eftir. Tað tynnist í flokkinum og árgangi 1943.

Tá vit fóru og 4. og 5.flokk, tað vóru ikki fleiri, fluttu vit niðan í nýggja skúla, hann var frá 1929, har Jákup lærari og Poul Enok tóku hongd um okkum við sama hegni sum "lærarinnan". Eitt sum vit misunti Onnu var, at hon hevði bert eitt hanagleiv í skúla, meðan serliga norðragøtubørn máttu stríða seg í øllum líkindum yvir til Gjáar. Men tá vit fyltu 14 var skúlagangurin av hjá flestu okkara, og tá var tað "lívsins skúli", sum eisini man hava roynst frægur.

Fleiri av okkum í flokkinum fylgdu Onnu og kundu minnast og kenna farran frá hesi tíðini.

Anna var dóttir Marsannu, sum var "frisør" og Jakku, sum var skómakari. Higar komu fólk frá "fjern og nær", at gera ymisk ørindi - onkur at snolla sær hárið og onnur at forsolla skógvar. Marsanna doyði fyri mongum árum síðani, men tað eru bert fáir mánaðir síðani, at Jakku fór, so tað gjørdist stutt millum faðir og dóttir. Systkini hjá Onnu eru Kári, Jóannes og Líggjas.

Øll sum komu inn til Jakku og Marsannu, komu eisini at kenna Onnu. Hon var kanska ikki heilt sum fólk flest, men tað hevði hon so einki fortreð av. Anna hevði eitt trygt heim, og her varð hon vard sum nakar. Anna var fitt og vinarlig við øll, og øll vóru góð við hana. Hon hevði eina serliga gávu, og tað var, at hon hevði sera gott minni. Hon kundi ártíggir aftan á greiða frá smálutum, sum vit onnur einki mintist til. Eisini var Anna trúføst sum trøllið, og er hetta ein góður eginleiki at hava.

Hon kom at kenna Aksel á Skipanesi. - Hann er ein partur av okkara søgu um Skipanes, sum vit hava havt í blaðnum og var abbasonur Petur Jakku í Ytstahúsi. Tey bæði giftust og búsettust á Fløtum á Skipanesi, og tað er tikið til, hvussu væl tey tóku sær av hvør øðrum. Hetta var tað besta sum kundi henda Onnu. Ikki minst nú, tá ið Anna var leingi sjúk, var Aksel um hana alla tíðina.

Nú komu vit at búgva á hvør sínum staði, men kortini hildu vit sambandið. Eg plagdi at ringja til hana føðingardagarnar at ynskja tillukku, og 11 dagar seinni ringdi hon til mín í somu ørindum. Soleiðis var tað ár um ár, til vit bæði fyltu 62 ár, men nú er eingin Anna at ringja til.

Tað verður einsligt hjá Aksel, nú eingin Anna er. Men vit kunnu so í felag varðveita øll tey góðu minnini, vit hava um hana.

Anna fór til gravar mikudagin, og nógv komu at vísa henni tann seinasta heiðurin. Hetta gjørdist eisini ein fagnaðardagur til veður, og ein slíkan dag hevði Anna uppiborið.

Friður verið við minninum um Annu.

*Óli*



*Fleiri skúlafelagar úr Gøtu skúla fylgdu. Frá vinstru Flóvin í Mortanstovu, Anna hjá Niklasi og Óli í Tjørnustovu.*



*Jákup Hansen talaði á grøvini. Sum tað sæst á myndini var hetta ein av fagrastu døgum*



*Hetta er universitetið í Gøtu. Yngru klassarnir gingu í eldra skúlanum th, við Helgu, konu Jákup Frederik Øregaard, sum "lærarinnu". Her sótu Óli og Anna lið um lið. Hetta var meira enn 50 ár undan nakrari Pisakanning. Hon nýttist heldur ikki. Úrslitini talaðu fyri seg.*

FØROYA LÆRARASKÚLI

LÆRARAÚTBÚGVINGIN

Vilt tú vera lærari?
Nú er greitt at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum tlf. 313501, Telduposti: flsk@flsk.fo, ella á heimasíðu skúlans: www.flsk.fo.

Skrivstovan er opin kl. 800 - 1600

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 16. juni.

LÆRARAÚTBÚGVINGIN
- ein útbúgving fyri lívið -

FØROYA LÆRARASKÚLI

NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN

Vilt tú vera pedagogur?
Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum tlf. 313501, Telduposti: flsk@flsk.fo, ella á heimasíðu skúlans: www.flsk.fo.

Skrivstovan er opin kl. 800 - 1600

Treytirnar fyri upptøku á námsligu útbúgvingini eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið 9 ár í skúla, hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving ella kann prógva samsvarandi kunnleika. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 16. juni.

LÆRARAÚTBÚGVINGIN
- ein útbúgving fyri lívið -

# Spennandi tilfar í komandi blað

Vit hava aftur eitt blað fult av áhugaverdum tilfari. Ikki minst halda vit søguna um tuberklarnar, sum vit skriva í samband við 90 ára dagin hjá Nikael Thomsen, vera áhugaverda. Vit fara seinni at hava fleiri myndir í hesum sambandi.

Tilfarið verður ikki minni áhugavert í komandi blaði. Í okkara frásagnum úr Íslandi fyrr í vár greiddu vit frá tí skjótt 100 ára gamal Oskar Jensen, sum vit hittu á røktarheiminum í Vifilstøðum í Reykjavík. Pápi hansara, Jens Fredrik Jensen, fór til Íslands seinast í 19. øld og giftist á Ísafjørðinum. Tá mamman doyði frá níggju børnum, komu fleiri av systkjunum til Føroyar. Vit hava nú savnað tilfar til ta áhugaverdu søguna um Oskar, og hon kemur í komandi blað.



*Í komandi blað hava vit søguna um Oskar, sum verður 100 ár 18. august.*

Vit fara tá eisini at hava søguna um eina av manningini á teimum russisku fiskiskipunum, sum plaga at koma higar. Hetta er eisini ein heilt óvanlig søga. Wondu er nevniliga etiopiari, sum fór til Russlands at lesa, tá kommunistarnir høvdu ræðið í Etiopia. Wondu er kristin, og merkir hetta eisini hansara frásøgn. Skipað varð eisini fyri, at Wondy kundi vitja sínar landsmenn, sum búgva í Norðragøtu, og komu tá sera ymiskar lagnur úr Etiopia at renna saman. Vit hava hitt Wondu og fingið hansara spennandi søgu.

Vit arbeiða eisini við øðrum áhugaverdum tilfari. Vit hava verið í Oyndarfirði og prátað við Andreas í Tarti, sum verður 100 ár tann 1. desember. Hann fór til skips í 1921, og hevur royndir á sjónum heilt fram til 1991. Andreas minnist ótrúliga væl. Hann hevur eftir minninum skrivað niður ta manning, sum hann var saman við fyrstu árini. Hansara frásøgn verður eitt gott íkast til okkara fiskimannasøgu.



*Tað er Johan Christiansen, havnarumsjónarmaður í Havn, sum hevur sett okkum í samband við Wondu, og vit hittust heima hjá honum. Her hevur Hjørdis, kona Johan, givið Wondu eina brølapu at hava heim við sær til nýføddu dóttrini. Eini slíkari kann saktans vera brúk fyri, tí kuldin í Murmansk, har hann býr, kann koma niður í 50 stig!*

# Teddy Kollek 95 ár



Tann 27. mai varð Teddy Kollek 95 ár. Hann er fyrr umrøddur her í blaðnum. Teddy er ein av teimum "stóru" í søgu Ísraels. Mest kendur var hann sum borgmeistari í Jerúsalem í heili 28 ár. Men annars er hann ein partur av søgu Ísraels. Sum ungur var hann í samráðingum við Adolf Eichmann fyri at bjarga jødum undan týning. Hann var fyrstu árini fremsti embætismaður hjá David Ben Gurion, sum má sigast at vera faðir til Ísrael.

Sambandið við Føroyar komst av, at Johan Niclasen í Hesti, sum var ein av fremstu ísraelsvinum í Føroyum, hevði samband við Kollek. Tá Johan doyði, boðaði Óli Jacobsen Kollek frá hesum, og teir hava síðan havt samband.

Nú er Teddy Kollek gamal og ússaligur, men hann fylgir framvegis við gongdini í "sínum" Jerúsalem, sum hann hevur ávirkað so nógv.

Hann fekk eisini eina heilsan frá okkum í samband við føðingardagin, sum hann helt saman við familjuni.

Okkara samband við Teddy er fyri ein stóran part verið um skrivaran hjá honum, Nomi Yeshua, sum eisini fylgir rættiliga væl við tí, sum hendir í Føroyum. Hon greiðir frá, at tey á Jerusalem Foundation, sum er grunnurin hjá Kollek, hava tey havt ein sjálvbodnan australiara, sum hevur arbeitt har. Tá hon sá føroyska álmanakkan á vegginum, sum er komin frá FF, greiddi hon frá, at hon læs føroyskt mál! Sum Nomi sigur: Verðin er lítil.

## Tveir mans brendir íhel við gomlu Stellu Kristinu

Mánadagin frættu vit frá okkara manni uppi á Flateyri á Vestfjarðum í Íslandi, Sniálv Røvilsberg av Sandi, at tveir mans vóru brendir í hel umborð á "Akureyri", sum er gamla "Stella Kristina".

Teir vóru staddir út fyri Vestfjarðir, tá eldur kom í saunarúmið umborð við hesum syrgiliga úrslitinum. Tað er ikki enn greitt hvør orsøkin er til brunan, men hetta verður kannað út í æsir.

Tey meira tilkomnu minnast væl tær glæsiligu Stellurnar sum komu til Klaksvíkar seinast í 1960-unum. Tað gekk eisini hampiliga væl at byrja við, men so fór at gangast verri, og skipini vóru seld til Ísland, har tey hava riggað væl. Besta prógvið fyri hesum man vera, at teir framvegis eru í rakstri meira enn 30 ár eftir at teir komu til Íslands, og úti við 40 ár eftir, at teir vóru bygdir.

Tað vóru nógv sum hildu tað vera harmiligt, at hesi stásiligu før vóru seld beint tá rækjuvinnan tók seg upp, og vit áttu ein rækjuflota, sum í fleiri ár gav nógvan pening til sovæl manning, skip og samfelag. Stellurnar høvdu riggað væl til rækjufiskiskap.

Sum vit greiddu frá fyrr í vár siglir Sniálvur við einum línubáti á Flateyri. Teir hava framvegis gott fiskari. Í mai hava teir higartil veitt 312 tons. Av hesum eru 90% toskur, og tað er ikki hissini toskur, hann vigar 12-15 kg. Hetta er ein veiða sum er dupult so stór sum undir Føroyum, sjálvt tá tað gongst væl.

Hetta er ein munurin millum Føroyar og Ísland, eisini tá tosað verður um tilfeingisgjald.

# Sáttmáli fingin fyri farmaskip

Sáttmálin hjá manningarfeløgunum millum Reiðarafelagið fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip gekk út 1.mars. Tað hava verið nakrir fundir millum partarnar síðan í februar. Hesir fundir hava bæði verið millum reiðarafelagið og øll manningarfeløgini um felagskrøv og millum reiðarafelagið og tey einstøku feløgini um serkrøv.

Endaligur fundur var millum partarnar seinasta fríggjadag og her samdust feløgini um ein nýggjan sáttmála, og er innihaldið í høvuðsheitum fylgjandi:

1. Arbeiðsgevaragjaldið til eftirlønartryggingina fer úr 4 upp í 5%.

2. Sjálv lønin hækkar við 1,7%, sum øll kemur uppá lønina í einum, t.v.s. frá 1.mars 2006. Hetta merkir, at samlaða hækkingin er nakað tann sama sum í teimum sáttmálum, sum eru gjørdir annars á arbeiðsmarknaðin. Hetta merkir groft roknað ein lønarhækking uppá ca. kr. 300 um mánaðin.

3. Longsta útmynstringartíðin fer frá 3 mánaðum niður í 2,5 mánaðum.

4. Uppsagnarreglurnar eru bøttar. Verandi skipan sum sigur, at uppsagnartíðin er 1 mánaði frá reiðarínum og hálvur mánaði frá manningini fær sum ískoyti, at eftir 3 ára starvstíð er uppsagnartíðin 2 mánaðir hjá reiðarí og 1 mánaði hjá manning.

Tað eru onnur mál av praktiskum slag, sum partarnir eru samdir um, og hesi venda vit aftur til. Annars má sigast, at samráðingarnar hava gingið væl. Sáttmálin er galdandi fyri 2 ár fram til 1. mars 2008.



*Manningarfeløgini.*



*Arbeiðsgevararnir.*



*Umboðini fyri sjómannadeild FFs.F.v. Jørleif Rein, Esmar Petersen, Óli Jacobsen og Vilborg Vestergaard.*

# Kunning um Føroyar umborð á stuttleikaferðamannaskipum

Í eini av okkara greinum úr Hetlandi greiddu vit frá øllum teimum ferðmannaskipunum, sum leggja at í Lerwick, eins og tey eisini kom á Havnina. Víst varð eisini á, at í Hetlandi royna tey at kunna ferðafólkini um staðið, tey eru komin til.

Hetta verður eisini roynt í føroyskum høpi, men á ein heilt annan hátt enn vit høvdu roknað við.

Her hava teir fingið ein eldri enskan fiskimann at fylgja við skipinum, har hann á ferðini skal greiða frá um fiskiskap, men eisini um londini, tey koma til. Fiskimaðurin eitur Ken Knox, og hann hevur siglt við enskum saltfiskatrolarum aftur í 1950-unum. Her var hann við at fiska undir Grønlandi eins og teir føroysku trolararnir, og tí er hansara søga eisini okkara søga.

Ken Knox skal vera við á tveimum túrum. Tann fyrsti er við "Black Prince" hjá Fred Olsen Line. Teir fara úr Leith í Skotlandi 22. juni og koma á Havnina leygardagin 24. juni. Her liggja teir kl. 8-15, og tá vita ferðafólkini longu, hvat tey koma til.



*Black Prince*

Vit hava útvegað Ken nakað av tilfari um Føroyar. M.a. vil hann eisini greiða frá føroysku siglingini undir krígnum. Her er tað so heppið, at frágreiðingin um kenda túrin hjá "Union Jack" er týdd til enskt, og hana hava vit sent Ken. Hann sigur, at hann eigur eina rúgvu av myndum úr Grønlandi, og tær hevur hann lovað okkum. Vit koma at hitta Ken, og hetta kemur uttan iva at síggjast aftur her í blaðnum.

Seinni túrurin verður við "Saga Rose", sum kemur á Havnina 21. august ella har á leið.

Sigast má, at hetta er eitt sera áhugavert tiltak, og kanska okkara egnu myndugleikar eiga at stuðla tiltøkum sum hesum. Roknast kann við, at tey ferðafólk, sum fara at fáa hesar frásagnir, neyvan fara at gloyma Føroyar eins lætt, sum tey annars vildu gjørt.

# NOVA ráðstevna í Norðurlandahúsinum

Tað frættist um nógv av teimum tiltøkum, ið verða hildin í Norðurlandahúsinum. Men okkurt av teimum frættist ikki eitt orð um.

Eitt av hesum var eina ráðstevna hjá NOVA, sum varð hildin 18. og 19.mai. NOVA sigur nú heldur ikki okkum so nógv.

Hetta er eitt samstarv millum lærdar háskúlar í Norðurlondum, sum fáast við frálæru og gransking innan landbúnaðarøkið.

Vit eru heldur ikki við í hesum samstarvinum. Tað eru bert Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki, sum eru limir. Vit okkara avmarkaða landbúnaði, hava vit nokk heldur ikki so nógv at gera her.

Men tað verður arbeitt við ymiskum áhugaverdum evnum sum eina burðardygga vinnu, eins og tosað verður um í fiskivinnuni. Eisini eru evni sum tryggjan av djóraheilsu og djóravælferð við í arbeiðsskránni. Hetta er øki sum munandi størri dentur verður lagdur á nú enn fyrr. Síðan eru meira vísindalig evni.

Felagsskapurin er stovnaður í 1995, og høvuðssætið er í Svøríki. Eitt av endamálunum er eisini at samskipa gransking millum londini.

Einasta føroyska ískastið til fundin var, at Bjarni Djurholm, sum landsstýrismaður í landbúnaðarmálum, bjóðaði vælkomin.

Endamálið við at hava fundin í Føroyum var at geva luttakarunum høvi til at gera seg kunnigar við hendan partin av norðanlondum. Hetta fingu teir eisini møguleika til við eini útferð sum var aftaná ráðstevnuna.

Sum tað skilst vóru luttakararnir, sum vóru um 50 í tali, sera nøgdir við fundin og umstøðurnar her.



*Kristina fegin um at vera komin aftur til Føroya.*

Vit hava í mong ár kent ein av finsku luttakarunum. Hetta er Kristina Lindstrøm, sum bert eina ferð hevur verið í Føroyum. Hetta var í 1975, tá hon fjakkaði her saman við dreinginum hjá sær. Tá komu tey at kenna Jonhard, svág Óla Jacobsen, sum er umrøddur í minningarorðunum um Onnu Hansen aðra staðni í blaðnum. Seinni kom Óli at kenna tey bæði, og hevur hann fleiri ferðir vitjað tey, tá leiðin hevur gingið til Helsinki.

Kristina er svenskfinsk, og er tí partur av tí minniluta í Finnlandi, sum hevur svenskt sum móðurmál, men sum tó dugur finskt til lítar. Hetta merkir, at tað er eingin trupulleiki at samskifta á skandinaviskum. Hetta er annars ein trupulleiki hjá nógvum finnum. Tey svenskfinsku hava sín egna flokk í Finnland, Svenske Folkepartiet, sum plagar at fáa eini 6% av atkvøðunum. Men annar er eingin tvídráttur millum hesar bólkarnar.

Kristina er granskari í mikrobiologi innan landbúnaðarøkið og hevur eisini frálæru á lærda háskúlanum í Helsinki. Í síni frítíð fæst hon við svimjing.

Hon eigur tvey børn, Lukas, sum er 20 ára, og Liselott, sum er 17. Kristina var fegin um at koma aftur til Føroya og vegna sín kennskap hendan vegin fekk hon eisini eina kunning um Føroyar, sum hinir luttakararnir ikki fingu.

Og so fekk hon eisini brell at koma higar aftur.



*Fundarluttakarar*



*Fundarluttakarar*

## Grønlandstíðindi frá Kára við Stein

14. mai
+ 3,2 stig og lot av norðri. “Salleq” kom inn at landa; teir skulu landa mánadagin um kvøldið. Av tí at Atlantskipið kemur, mugu teir bíða við landing til tað skipið er útlossað, so teir verða noyddir at loysa frá landi í morgin og út at stima til í annaðkvøld einaferð - og vit skriva ár 2006!

15. mai
“Salleq” kom inn til kai í kvøld at landa; teir hava fulla last inni.

16. mai
+ 8,8 stig og stilli, ein fínur dagur. “Salleq” fór nýggjan túr í kvøld, og teir vóru ikki meira enn leysir frá kaiini, so kom “Qaqqatsiaq” - fyrrverandi “Steffen C” - inn at landa. “Qaqqatsiaq” hevur gott og væl 400 tons inni hendan túrin.

18. mai
+ 5,4 stig og lot av vestri. “Ocean Tiger” kom inn í morgun at landa og skifta nakað av fólki. Teir hava gott og væl 380 tons inni, og teir byrja at landa so skjótt sum “Qaqqatsiaq” er liðugur at landa.

“Polar Natarnaq” legði snútan inn her eftir onkrum luti. Teir komu úr Manitsoq, har teir høvdu landað; teir høvdu aftur fulla last hendan túrin.

Eg tosaði við ein mann í dag, sum eigur ein krabbabát uppá 35 fót. Hann lat væl at fiskarínum. Í morgun høvdu teir drigið 3 rekkjur, sum teir kalla; ein rekkja telur 50 teinar. Teir høvdu 100 kassar í morgun, og tað liggur ímillum 25-30 kg í kassanum. Krabbin var góður í støðd, og teir, sum fiska rognkelsi og taka rognini úr, hava gott fiskarí. Virkið tekur ímóti 2-3 tonsum um dagin av rognum.

Várið er við at enda, tí nú eru fólk byrjað at samla másaegg, og tey fyrstu eggini eru longu at fáa til keyps. Tey eru væl etandi, og mær dámar tey ónatúrliga væl upp á breyð.

23. mai
+ 4,6 stig og stilli. “Ocean Tiger” kom inn í morgum eftir pakningi, teir hava gott 100 tons inni: “Polar Timmjarmiut” er í Nuuk og landar 450 tons eftir 11 daga roynd - frálíkt fiskarí hjá teimum. Teir liggja norðuri í Kassanum og royna saman við “Sallaq” og “Polar Natarnaq”. “Markus” er inni í Nuuk og landar; teir komu í gjár.

24. mai
+ 2,6 stig og stilli. “Natarnaq” kom inn at millumlanda. Teimum manglaði nøkur fá tons í fulla last, og teir skulu annars til Nuuk mánadagin at landa og skifta fólk. Teir fóru út aftur seinnapartin.

“Lómur kom inn at landa í morgun, teir hava gott 100 tons inni av ísaðum rækjum hendan túrin.

Skeljabáturin, “Anna Kiil”, kom inn at landa í morgun. Skiparin og stýrimaðurin eru føroyingar. Teir hava 21 tons inni av pilkaðum. Tey, sum pilka, fáa 24 tons fyri kg, tað er ein akkordløn, sum verður givin, og tað verður vigað, so hvørt sum spannin, tey pilka í, verður full. Har umborð sita rognini eftir, og tey taka ein lítlan strong burtur, sum gongur til nýruni, tí tað skal vera kvikksilvur í nýrunum. Tað ljóðar, at prísurin er líka niðanfyri 100 kr. á marknaðinum í dag.

Umborð á “Louise L” verður pilkað við maskin, og rognini verða tikin av

Nú á døgum verður tosað so nógv um ov gamalt kjøt, og eg var úti fyri tí í Brúksuni í dag. Í einum kølidiski lá “lammesuppekød” tilboð, og har lógu nógvir pakkar av slagnum, men í pakkanum vóru 3-4 stykki av skornum lambskjøti, og rest var so reinsdjórakjøt ella moskusoksakjøt. Eg fekk fatur á slaktaranum og segði við hann, at ikki alt var lambskjøt. Hann var skjótur at siga: “Skal vi vædde?” So sigi eg við hann, at eg hevði etið nógv lambskjøt og slaktað nógv lomb, langt áðrenn hann hevði pissað í sína fyrstu blæu, og tað skuldi eingin slaktari koma og fortelja einum føroyingi, hvussu lambskjøt sá út, og líka mikið, hvussu fordervað tað var, so kundi eg síggja mun á. Eg legði einki í at diskutera við hann, men segði við hann, at hann mátti fara í læru umaftur, sum støðan var nú. Eg fór upp og fortaldi einum av leiðarunum, hvat eg hevði upplivað, og hann segði, at tað skuldi hann orðna beinanvegin. Allir pakkarnir vórðu tiknir úr kølidiskinum beinanvegin, og eg fór til hann aftur og segði: “Har du fundet ud af, at det ikke var lammekød det hele?” Tað kvøtti ikki úr honum.



sjúklingum fækkaðist. “Nýggja hús” varð tikið til røktardeild til gomul fólk. Hannefía helt, at tey gomlu trivust væl, og tað var stuttligt at síggja, hvussu glað tey vóru um at sleppa út, tá tey høvdu etið morgunmat. Tað var nógva staðni, tey kundu seta seg, og tey kundu spáka í friði og náðum fyri bilum.

Hetta var ikki júst møguleikar, tey høvdu í barakkunum við landssjúkrahúsið meira enn 40 ár seinni.

Seinast í fimtiáriunum fóru tey at gera seg til reiðar at flyta úr Hoydølum, nú talið á sjúklingum fækkaðist. Barakkirnar vóru bert ein fyribilsloysn. Tuberklastøðin flutti fyrst, og skipsmenn og onnur fóru út hagar til kanningar.

Annað stigið var at flyta teir fáu sjúklingarnar oman. Bert onnur helvtin av barakkini var liðugt smíðað. Alt var øðrvísi, og Hannefía minnist, hvussu óunniligt tað var at sita náttarvakt, tí hurðin inn til tað ólidna kundi ikki latast í lás. Hon stóð har og flákraði í vindi, og myrkt var hinumegin.

Tá liðugt var at smíða, komu tey gomlu á røktardeildini eisini oman. Men teimum dámdu illa at flyta oman, og teimum longdust niðan aftur. Har uppi var so friðarligt, og her komu tey út á alfaraveg bert við at gloppa hurðina.

Hannefía arbeiddi á barakkini til hon fall fyri aldursmarkinum. Tað var skjótt, at tey bert høvdu eina stovu standandi at taka ímóti tuberklasjúklingum. Og kom onkur var støðgurin sjáldan langur við tí heilivági, sum fanst.

Medisinska deildin á hospitalinum fekk nakrar sjúkrastovur burturav, og røktardeildin var eisini undir hospitalinum. So við og við arbeiddu sjúkrasystrarnar á tuberkadeildini eisini á øðrum deildum í húsinum.

Hanne Fía var annars sera virkin. M.a. var hon í 1957 á alheimsráðstevnu fyri sjúkrasystrar í Rom saman við tveimum øðrum. Onnur var Henrikka Næsaa, sum eisini er kend frá sanatoriinum. Kirstin Schrøder, ið eisini starvaðis á sanatoriunum var hin triðja. Hendan túrin hittu tær sjálvan pávan. Hanne Fía doyði í juli 2002, 89 ára gomul.



*Jóan Jakku saman við Amandu á Skipanesi. Hon var gift við Árna úr Konoy, son Símun Paula, fyrsta formann í FF. Amanda var kend sum ein framúr sjónleikari.*



*Jóan Jakku og Hildigarð. Tey vóru nýliga gift og áttu ein son tá Jóan Jakku gjørdist sjúkur. Hildigarð greiðir frá í greinini hvussu umstøðurnar vóru hjá familjumonnum.*



*Her lærir Nikal abbasonin at fletta.*



*Jóan Jakku saman Andreas Skipanes, tv., sum giftist við pirkuni, Marin.*



*Nikal saman við systkinabørnunum Petur og Nancy*



*Her hava tey verið eftir mjólk. Jóan Jakku uttast th.*

## Sanatoriið niðurlagt og studentaskúli kemur í staðin

So hendi tað, at santoriið varð niðurlagt sum slíkt, og tað gingu nakrir mánaðir, har tað var mannleyst. Nikael hevði tá møguleika at fara til Havnar, tí Bonnivie, sum var umsjónarmaður á hospitalinum, bjóðaði honum portørstarvið aftur. Men hann hevði hug at vera verandi í Hoydølum, so hann fekk tá til arbeiðis at ansa eftir bygningunum har uppi.

Tað var skjótt, at skúlamyndugleikarnir fingu áhuga fyri at flyta studentaskúlan niðan higar.

Her máttu eisini útskiftingar gerast í sambandi við, at bygningarnir skuldu brúkast til skúla. Svinghurðarnar blivu skiftar út við vanligar hurðar. Í hesum lá eisini ein ræðsla fyri, at smittan kundu hanga við. Tí varð eisini alt vaskað væl og virðiliga.

## Fyrstu studentsprógvini í Hoydølum

Tá skúlaárið 1961/62 endaði, vildi Christian Haraldsen, settur rektari á skúlanum, sleppa at handa prógvini í Hoydølum. Nikael hevði fyrireikað alt so væl. Hann hevði gjørt gøtuna góða og gjørt brúgv av bræddum pelum út á gomlu krokkplenuna. Tey munnu vera mong, sum minnast hesa løtuna, og tey, sum fingu prógv hendan dagin, gjørdust kend fólk í samfelagnum. Ein av teimum var Helena Samuelsen. Hon minnist, at tá studentarnir høvdu fingið prógv og Haraldsen hevði hildið røðu, bjóðaðu Nikael og konan øllum til borðs í spísistovuni í Nýggja húsi.

Aftan á summarfrítíðina í 1962 flutti studenta- og preliminerskúlin niðan í Hoydalar. Gamla sanatoriið varð gjørt til skúla og Nýggja hús var kostdeild. So var aftur lív í dalinum. Maskinmeistarin á tuberklastøðini varð settur skúlatænari í somu húsum.

Arbeiðið broyttist nakað men ikki so nógv kortini. Nikael helt alt í góðum standi, sum hann var vanur. Men nú komu reingerðarfólk til skúlan, og skúlatænarin skipaði fyri reingerðini. Hetta var sjálvsagt øðrvísi, men alt gekk við lagaligheit.

Helena skrivar:

“Tað vóru nógvar stuttligar og ikki bert tungar løtur í Hoydølum frammanundan. Men tá so nógv frísk og røsk ung koma niðan í senn, so er tað sjálvsagt, at nú var lívligari.

Nikael hevði sama góða samband við skúlaungdómin sum frammanundan við sjúklingarnar. Hann letur eisini sera væl at nælingunum. Vísa vit teimum álit, so liva tey eisini upp til tað”.

## Tíðin sum pensjonistur

Hóast ein virknan arbeiðsdag, har arbeiðstíðin ikki altíð var løgd eftir klokkuni, men meira eftir, hvussu nógv arbeiði skuldi fáast frá hondini, so hevði Nikael eisini síni frítíðarítriv. Hann sigur, at um hann ikki hevði fingið tuberklar, so hevði hann helst verið sjómaður burturav. Honum hevur altíð longst eftir sjólívinum, og hann hevur notið nógvar góðar løtur á útróðri, og túrarnir við kalvalínuni við Vilhelm Magnussen eru nakrar av teimum bestu løtunum hann minnist.

Tað kann verða skoytt

Framhald á næstu síðu



*Rætti teksturin til hesa myndina er: F.v. Per Højgaard, systkinabarn, Edvard og Palli, pápabeiggjar, og Nikael sjálvur.*



*Palli skræddarin, beiggi Nikael, var skótaleiðari í Gøtu í sínum ungdómi.*



*Vit hava fingið hesi nøvnini: 1. ókend, 2.Jákup Øre, Fuglafjørð 3.Jóan Fredrik Joensen, Sørvág, 4.Dánjal Thomasen, Sørvág, 5.ókendur, 6.Hans Eli Hansen. Sørvág, 7. ókendur, 8. ókendur, Frammanfyri Karin Reinert, Skopun. Vit vilja fegin frætta um nakar kennist við.*

uppí her, at Nikael hevur smíðað sín egna bát. Hetta er ikki hvønn mans føri og sigur nakað um handalagið.

Ville Magnussen hevði ein strævnan arbeiðsdag, einsamallur lækni á øllum Sanatoriunum, og veiðitúrar hansara, vóru hansara háttur at basa stressinum. Ville Magnussen var bóndasonur av Kvíggjarhamri í Saksum, og Nikael og Ville plagdu at føða veðurlomb inni um veturin og sleppa teimum í Høvdaberg í Saksum um summarið. Á heysti høvdu teir mangan góðan túrin í Saksum, tá teir fóru í skorarnar eftir veðrunum.

Tá Sanatoriið varð niðurlagt, og Føroya Studentaskúli flutti niðan í Hoydalar, var tíðin komin til, at Nikael við familju flutti burtur úr húsinum. Hann bygdi sær hús beint omanfyri Hoydalar á Hvítanesvegnum. Húsini vóru, tá tey vórðu bygd í 1963, bert hini triðju húsini omanfyri Hvítanesvegin, og lógu í haganum. Síðani tá er so mangt broytt. Nikael og Hannefía ruddaðu hagan og hava nýtt mangar, mangar tímar at broyta lyngheiðin til ein vakran urtagarð. Og ikki at tala um tær snøggu grótlaðingar, sum eru kring húsini.

Sum tíðin fer broytast áhugi og evni, men Nikael, sum er farin um níti árini, er rættiliga birgur, og honum dámar sera væl at fara oman í Undirhúsið í Vágsbotni um dagarnar at fáa eitt prát og taka kortini upp til ein sjavs. Seinastu árini hevur hann eisini sæð tað sum eina kærkomna uppgávu at læra langabbasynirnar at fletta og hagreiða skurðin.

Annars hevur Nikael stóran áhuga fyri dagsins málum og fylgir væl við - bæði á politiska økinum og aðra staðni. Honum dámar væl ein góðan fótbóltsdyst, og sjálvt um hann hevur búð størsta partin av lívinum í høvuðsstaðnum, so er hann tó mest spentur upp á úrslitið av dystunum hjá GÍ.

Í dag býr Nikael saman við abbasoninum.



*Nikael saman við langabbabørnum.*

# Løgtingsfrágreiðingar

Í løgtingstíðindum finst nógv tilfar um sanatoriið. Tað var nevniliga ein løgtingsnevnd, sum hevði ábyrgdina av rakstrinum, og henda legði hvørt ár fram til 1948 eina frágreiðing fyri tingið. Her verður rættiliga farið í smálutir og er hetta tí rættiliga áhugavert.

Vit fara at taka okkurt burtur úr hesum frágreiðingum, sum fevnir um tað tíðarskeiðið, tá ið Nikael arbeiddi her, og taka vit hetta ár fyri ár.

**1943**

Tað týdningarmesta fyri hesa søgu er, at “19. mars samtykti nevndin

1. at seta Nikael Thomsen, portør við Dronning Alexandrines Hospital til maskinpassara.

Á fundi 24. september var samtykt at gera verkstaðin størri og betri enn núverandi og fáa í betri lag húsrúm til maskinpassaran. Seinni í frágreiðingini verður eisini sagt, at hitaverkið á gomlu deild er liðugt og virkar væl.

Í somu ársfrágreiðing verður sagt, at Anthon Kragesteen søkir um at leiga 15.000 kvadratmetrar burtur av økinum hjá sanatoriinum til høsnagarð. Nevndin kann tó bert mæla til, at leiga verða 5.000 fermetrar, treytað av, at hann hegnar forsvarliga, og at bróstsjúkrahúsið fær fyrsta rætt at keypa egg, tá hann selur.

Hetta var í kírgstíð, og tað var ikki so lætt at útvega fjølbroyttan mat. Serliga var tørvur á viðskera, meðan tað ikki var nakar trupulleiki við døgurðamati. Men niðurstøðan var, at viðvíkjandi viðskera skuldi ikki sparast. Her verður eisini hugsað um rationaliseringar. Tað, sum kann keypast í stórum, eigur at verða keypt saman við hospitalinum.

Annars klagaðu sjúklingarnir um, at teir ikki sluppu til Havnar, og tað varð sløkt kl. 20.30.Afturat hesum var trupult at fáa pakkar. Hetta við pakkunum skuldi loysn fáast á.

Umstøðurnar hjá sjúklingunum verða eisini væl lýstar við hesum brotinum úr frágreiðingini.

*“Havnagongdini viðvíkjandi upplýsti yvirlæknin, at forboðið, sum annars svarar til reglur á flest øllum bróstsjúkrahúsum, má krevjast yvirhildið, tí smittandi sjúklingar hava ikki eina ferð, men fleiri ferðir verið í dansi í Havn, tó at havt var at teimum fyrstu ferð. Her kann verða skoytt upp í, at smittandi tuberklar vóru í lungunum, tí var tað spýttið sum smittaði. Tuberklar kundu seta seg aðra staðni, t.d. í beinið, men tá smittaðu teir ikki. Viðvíkjandi sløkkitíðini var ført fram, at á bróstsjúkrahúsinum var sløkt ½ tíma seinni enn á hospitalinum í Havn.*

*Nevndin helt yvir fyri sjúklingunum fram, at tær reglur fyri dagligan ordan, sum yvirlæknin setir, mugu haldast. Bróstsjúkan, sum kann binda sjúklingar í áravís til eitt sjúkrahús, kann ikki annað enn gera nógvar sjúklingar troyttar og taka mótið frá teimum. Her ræður nógv um, at lækni, sjúkrasystrar og onnur, ið ganga um teir í sínum dagliga arbeiði, vísa teimum samkenslu og blíðskap men eisini hjá sjúklingum ikki at gerast órímiligir. Hetta hevur nevndin hildið fram bæði yvirfyri sjúkrasystrum og sjúklingum, og hevur ta vón, at tað stríð, sum hevur verið, fer at javna seg”.*

**1944**

Hetta ár kravdu neytaeigarar á Hvítanesi og Hoyvík at fáa mjólkaprísin hækkaðan frá 65 oyru til 71 oyru fyri liturin. Teir sluppu at velja millum 68 oyru fyri alla mjólkina ella 71 oyru fyri 100 litrar.Teir valdu fyrra møguleikan.

Hetta ár hækka teir eisini lønirnar til gentur, sum arbeiða á sanatoriinum við kr. 20 um mánaðin.Tað tykist at vera hopleyst annars at fáa gentur. Sjúkrasystrarnar fingu 100 kr. eyka eisini. Hetta ár hevur einki misljóð verið um kostin. Teir spurdu sjúklingarnir siga, at kosturin er góður.

**1945**

Hetta ár er stór øking í útreiðslum til umvælingar, sum fara frá kr. 7.000 upp í kr. 26.000. Fremsta orsøkin er nýtt hitaverk.

Sanatoriivegurin innan brúnna treingir til umvæling, sum er ætlað at kosta kr. 1.500, men kommunurnar hava ikki viljað goldið.

**1946**

Hetta er árið, tá Magnussen byrjar sínar ferðir kring landið at pirka og koppseta fólk. Til hesa ætlan hevur løgtingið játtað kr. 10.000. Aksel Poulsen verður virkandi yvirlækni hesa tíðina.

Hetta ár er eisini eitt dømi um spennandi vinnulívsætlan. HCW Tórgarð hevur sent eina umsókn um at fáa øki burtur av tí hjá sanatoriinum til eitt lýsiraffinarí, sum Kimbil, Tór, Vága Trolarafelag og onnur standa fyri. Hetta mál fær eina góða móttøku, og landsnevndin fær heimild til at selja ynskta økið. Tað spurdist ikki meira burtur úr hesum.

Nú er aftur spurningurin um matin frammi. Summi halda hann vera ov vánaligan. Aksel Poulen heldur hann tó ikki vera so galnan, men meira skerpikjøt kundi verið brúkt.

Eitt annað mál er tann nógvan yvirtíðin. Hon kemur fyrst og fremst av tuberklastøðini. Nú kríggið er av, eru skipini aftur fullmannað, og hetta merkir tí eisini størri arbeiði á hesum økinum. Tosað verður eisini um at flyta tuberklastøðina úr Hoydølum. Hon var eisini sera óhøglig fyri sjómenninar, men hetta mælti Magnussen frá, og tað hendi heldur ikki meira tá.

Annars vóru lønirnar hjá sjúkrasytrum tá kr. 265 um mánaðin, og yvirtíðarløn var kr. 4,25.

Tað verður eisini tosað um at útbyggja sanatoriið, men hetta gjørdist tíbetur púra óneyðugt.

**1947**

Hetta ár verður ein eykalækni settur og er hetta Astrid Klein. Eisini fær Nikael lønarhækking, kr. 100 um mánaðin.

Tað var trupult at fáa sjúkrasystrar, og Dansk Sygeplejeråd noktaði donskum sjúkrasystrum at søkja, um ikki tær fingu danskar treytir, sum m.a. var 8 tímar arbeiðsdag. Seinni sama ár vóru hesar treytir eftirlíkaðar.

Nú kann staðfestast, at talið á sjúklingum er nógv minkandi. Árið frammanundan vóru 72 sjúklingar á teimum trimum deildunum. Í ár er TB tómt, og í Hoydølum eru 42 sjúklingar. Víst eru nakrir farnir til Danmarkar, men framvegis er talan um minking.

Á hospitalinum í Havna plaga javnan 20 sjúkligar at liggja við byrjandi tuberklum og eftirsjúkum, men í ár hevur mestsum eingin verið.

Um tað er onkur sum hevur nakað at skoyta uppí um okkata tuberklasøgu vilja vit fegin frætta.

## Klaksvíkar Sjúkrahús ger tað lættari at ringja

**Nú verður lættari at minnast telefonnummarið hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, tí nýggja nummarið hjá sjúkrahúsinum er 45 45 45.**

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur fingið nýtt telefonnummar, sum skal avloysa gamla nummarið, ið ikki var serliga lætt at minnast.

Nýggja nummarið er 45 45 45 - tríggjar ferðir 45 - og tað verður ivaleyst munandi lættari hjá fólki at minnast til.

- Fólk hava stundum fyri neyðini at koma í samband við Klaksvíkar Sjúkrahús í skundi, og við einum einføldum telefonnummari verður tað vónandi skjótari og lættari hjá fólki at ringja, sigur Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.



# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða kona mín, mamma, vermamma og omma okkara

**HANNELINA JOENSEN við Gjógv**

andaðist og varð jarðað. Tøkk til prestarnar Hera Joensen, Berg Debes Joensen og Emil Olsen, fyri góð og troystarrík orð. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu til Gjáar kirkju, og øllum teimum mongu sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Erling**
**Oda, Jørgin, Hannelina, Elsa og Erling**







**MAN B&W Diesel A/S**

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 Fax: +298 31 30 64


# Søvnini í Føroyum í summar

Vágs Sóknar Bygdasavn
Sjósavnið í Stóra Pakkhúsi
Savnið er opið frá 15. juni til 15. september,
fríggjadag kl. 17 - 20, leygardag kl. 9 - 11
og sunnudag kl. 17 - 20.
Annars eftir avtalu við kunningarstovuna í Vági, tlf. 374332.
Atgongugjald: 20,- kr.

Porkeris Bygdarsavn
Gamli Skúli
Savnið er opið í juni, juli og august, sunnudag kl. 14 - 17.
Annars eftir avtalu á tlf. 373176 ella 573176.
Atgongugjald: 20,- kr.

Tvøroyrar bygda-og sjóvinnusavn
Gamla Doktarahúsið
Savnið er opið í juni, juli og august, sunnudag kl. 15 - 18.
Annars eftir avtalu við kunningarstovuna á Tvøroyri,
tlf. 372480 ella 228241.
Atgongugjald: 20,- kr.

Sands Bygdarsavn
Norðara Koyta
Savnið er opið í juni, juli og august, sunnudag kl. 14 - 16.
Annars eftir avtalu við kunningarstovuna á Sandi,
tlf. 361836 ella 222078.
Atgongugjald: 30,- kr.

Nólsoyar Bygdarsavn
Húsini við Brunn
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 327020 ella 327003.
Atgongugjald: 20,- kr.

Sørvágs Bygdarsavn
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 332893, 333284 ella 333191.
Atgongugjald: 30,- kr.

Miðvágs Bygdasavn
Kálvalíðhúsini
Savnið er opið eftir avtalu á tlf. 332425 ella við at venda sær til Vága Kunningarstovu, tlf. 333455 ella 213455.
Atgongugjald: 1 - 10 fólk 30,- kr., 11 - 20 fólk 20,- kr., 21 ella fleiri fólk 15, - kr. fyri hvønn.

Vestmanna Bygdarsavn
Savnið er opið eftir nærri avtalu við Vestmanna kommunu, tlf. 470110.
Ókeypis atgongd.

Eiðis bygdasavn
Látrarlonin
Savnið er opið í juni og juli, mikudag og sunnudag kl. 14 - 16.
Annars eftir avtalu á tlf. 423597, 423269, 423031 og 423102.
Atgongugjald: 30,- kr., børn ókeypis.

Bygdasavnið í Nes kommunu
Gamli Prestagarðurin
Savnið er opið í juni, juli og august, týsdag kl. 16 - 19
og sunnudag kl. 15 - 18.
Annars eftir avtalu á tlf. 447696, 449214/219214, 447438
ella 447251.
Atgongugjald: 30,- kr. Bólkar, min. 10, 20,- kr. Børn undir 16 ár ókeypis.

Bygdasavnið Forni
Glyvrar
Savnið er opið frá 12. juni til 13. september, mánadag
og mikudag kl. 16 - 18 og sunnudag kl. 15 - 17.
Annars eftir avtalu á tlf. 226088, 447391 ella 449214.
Atgongugjald: 30,- kr. Bólkar, min. 10, 20,- kr. fyri hvønn.

Gøtu Fornminnissavn
Blásastova við hoyggjhúsinum og Glyvra Hanusarhús
Savnið er opið í juni, juli og august, mánadag, týsdag,
fríggjadag, leygardag og sunnudag kl. 14 - 16. Stongt 28. og 29. juli.
Annars eftir avtalu á tlf. 222717 ella 228768.
Atgongugjald: Vaksin 30,- kr., børn 10,- kr.

Norðoya Fornminnasavn
Handilshúsini, Gamla Apotekið, Klaksvík
Savnið er opið frá 15. mai til 15. september, hvønn dag kl. 13 - 16.
Annars eftir avtalu á tlf. 456287 ella 456939.
Atgongugjald: 20,- kr. Bólkar, min. 10, 15,- kr. fyri hvønn.




*Bókin hjá Pløyen kann enn nýtast sum ferðavegleiðing.*

# Pløyen í Hetlandi

## Øll vita, at Pløyen kom úr Hetlandi við línuni. Vit hava lisið ferðafrágreiðingina.

Christian Pløyen er farin í søguna sum ein av bestu donsku amtmonnunum, ið vit hava havt í Føroyum. Hann varð føddur í 1803 og doyði í 1867. Hann var amtmaður í Føroyum frá 1837-1849. Afturat amtmansembætinum var hann eisini fúti. Hann hevði eina veruliga umsorgan fyri føroyingum og var ein íðin forsprákari fyri at taka av kongaliga einahandlinum, sum hann metti vera eina forðing fyri menning í Føroyum. Í 1848 gjørdist hann kongavaldur limur í fyrsta grundlógargevandi tinginum, og her talaði hann eisini fyri størri sjálvræði til føroyingar.

Fremsta avrik, ið liggur eftir hann, er bókin "Erindringer fra en rejse til Shetlandsøerne, Ørkenøerne og Skotland i Sommeren 1839."

Í sambandi við okkara frásagnir úr Hetlandi er tað sera áhugavert at hyggja at, hvussu Christian Pløyen í 1839 upplivdi Hetland. Vit hava longu havt okkurt brot úr bókini, men her skal takast okkurt fram, sum hevur áhuga framvegis í dag.

Søgan um hesa ferðina er sera hugtakandi, og ikki minst innleiðingin til bókina, har hann skrivar:

Færøernes Beboere, som jeg har så inderligt kjære, blandt hvilke jeg haaber at tælle ikke saa faa Venner, helliges denne lille Bog med de bedste Ønsker for den fremtidige Udvikling.

Í fororðinum til bókina sigur Pløyen, at hann heldur seg hava skyldu til at greiða frá hesi ferðini, sum tað almenna hevur goldið, og hetta er blivin ein bók upp á heilar 171 síður. Hetta sigur eisini nakað um mannin.

Endamálið við ferðini var at finna hugskot til, hvussu bøtast kundi um livikorini í Føroyum, og tað er alment kent, at eitt av úrslitunum á ferðini var, at føroyingar fóru at brúka línu at fiska við. Tá var fiskiveiða í Føroyum bert ein viðfáningur, meðan hon var nógv meira framkomin í Hetland. Eitt annað nýbrot av ferðini var pinnagrevið, sum var soleiðis háttað, at man bert skuldi grava eina ferð fyri hvørja torvuna, meðan føroyingar - við táverandi haka - máttu grava tvær ferðir.

Hann hevði annars eisini hoyrt um eina arbeiðssparandi torvpressu, sum skuldi finnast á hesum leiðum, og hann ætlaði eisini at útvega setepli fyri at fáa gongd á eplavelting í Føroyum. Harafturat hevði hann í huga at fáa fatur á kúm og tarvum til at kunna bøta um neytaslagið í Føroyum.




*Hetland*

### Ferðin til Hetlands

Hann hevði tríggjar føroyingar við á ferðini og skuldu teir vera við til at seta tær nýhugsanir í verk, sum teir funnu fram til í Hetlandi. Hesir vóru Poul Joensen, av Látrinum, á Eiði, Poul Joensen úr Nólsoy og Mourits Mohr úr Hoyvík. Mourits var bert 19 ára gamal og bað um at sleppa við fyri egna rokning.

Ferðalagið fór úr Føroyum tann 1. juli 1839 við einum skipi hjá einahandlinum. Tann 5. juli vórðu teir settir av í Lerwick.

Tað fyrsta Pløyen leggur til merkis er, at í Lerwick er munandi meira arbeiði enn í Havn, har so at siga einki lønarbeiði var. At arbeiði var í Lerwick komst fyrst og fremst av øllum fiskaarbeiðinum og sjóvinnuni, sum var har.

Her sær ferðalagið saltfiskavirking av toski og longu, og Pløyen tók beinanvegin stig til, at føroyingarnir fóru at læra seg hesa framleiðsluna. Pløyen tekur til, at sjálvt um harra Ogilvy, sum framleiðarin kallaðist, kundi rokna við at fáa ein kappingarneyta, so var hann meira enn fegin um at kunna føroyingar um saltfiskaframleiðslu.

Síðani fer Pløyen at ferðast kring um í Hetlandi. Hann kemur fyrst til Scalloway, soleiðis um vit hava greitt frá í aðrari grein. Hagani fer hann til oynna Burra, hagar hann verður førdur við báti, sum líkist teimum føroysku, men hetlendingar brúka meira segl enn føroyingar, sigur hann.

Á oynni Burra er verulig nógv at síggja. Her sá hann stórar stakkar av klippfiski, og ein hóp av fólki - bæði konufólk og mannfólk - sum arbeiddi fisk, eins og vit nógv ár seinni gjørdu í Føroyum. Tá var einasta fiskaframleiðsla í Føroyum nakað av stokkfiski. Eisini á Burra vóru teir fúsir at læra frá sær, hvussu saltog klippfiskur varð virkaður.

Fiskurin, sum kom upp á land á Burra, varð lutvíst veiddur við opnum bátum og lutvíst við sluppum. Sluppirnar vórðu serliga nýttar um veturin og várið, og ein stórur partur av veiðuni varð fluttur livandi til London í dammum. I London búðu tá 1,5 mió. fólk, og her var ein góður marknaður fyri fiski. Pløyen heldur tó, at London er ov langt burtur frá Føroyum til at hetta kundin koma okkum til nyttu.

Í bókini verður eisini greitt frá umstøðunum við sluppveiðuni. Ein munur frá okkara viðurskiftum var, at manningin sjálv rindaði fyri reiðskapin. Býtið var helvt um helvt, og reiðarin keypti fiskin fyri avtalaðan prís. Hetta gjørdi, at manningini slapp undan tí stríðnum at hava ábyrgdina av fiskinum aftaná, at hann var landaður.

Skipini fiska vanliga við



*Seksmannafar, sum var grundarlagið fyri summarveiðu við línu.*



*Útróðrarstøð.*



*Bátarnir liggja inni.*

snøri eins og føroyingar, men teir veiða meira enn føroyingar, tí teir missa ikki tolið, sjálvt um fiskurin ikki tekur beinanvegin, og hetta loysir seg oftast.

Dømi er nevnt um eina slupp, sum fiskaði undir Føroyum í en útsynning úr Suðuroynni. Henda sluppin fekk fyrsta túrin 9.000 og seinna túrin 5.000 toskar, og manningin var bert 8. Føroyingar fingu lítið og einki burtur úr á somu leiðum.

### Línan í Hetlandi

Tann týdningarmesta veiðan er tó línuveiða við seksmannaførum. Hendan veiðan byrjar mitt í ella í seinnu helvt í mai mánaði og endar 12. august.

Her skjýtur Pløyen inn, at tað, sum hendi í Hetlandi - eftir at oyggjarnar komu undir bretskt ræði, var, at jørðin við makt varð løgd undir nakrar fáar stórar eigarar, sum høvdu ein hóp av uppsitarum, sum veruliga vóru eitt slag av trælum hjá teimum stóru.

Línuveiðan var so kostnaðarmikil, at teir fátæku uppsitararnir ikki høvdu ráð at fíggja reiðskap og bát, og tí vóru tað harramenninir, sum fíggjaðu og harvið blivu uppsitararnar enn meira heftir, m.a. við at teir skulu selja allan fiskin til harramannin fyri ein prís, sum harramaðurin ásetti.

Hvør lína var 42 favnar og hevði 10 húkar. Hvør bátur kundi hava 120 línur, so var knýtt saman, tá hon var sett. Tilsamans vóru 1200 húkar á línuni, sum strekti 5.000 favnar.

Tað var tískil stórur munur á effektivitetinum á línuveiðu og so okkara snørisveiðu. Í Hetlandi vóru 1200 húkar til 6 mans, meðan hjá okkum bert vóru 5 húkar til 6 mans!

Tann 6. maðurin fiskaði ikki og mátti andøva, meðan hinir 5 fiskaðu.

Hetlendingar nýttu sei ella hýsu sum agn, og teir lótu agnið fjala húkin, og hetta førdi við sær, at fiskurin slúkti húkin saman við agninum. Føroyingar lótu agnið hanga niður frá buganum á húkinum. Tá kann fiskurin lættliga fara við agninum uttan at taka húkin. Hetlendsku húkarnir vóru eisini nógv smærri enn teir, sum føroyingar brúktu. Teir vóru bert ein fjórðing til støddar av teimum húkunum, sum føroyingar brúktu, men tað gjørdi ikki, at teir fingu minni burtur úr - teir fingu heldur meira.

Ein útróðrartúrur vardi í 24 tímar. Teir fóru út á morgni, og fóru so langt út, at teir sóu ikki land. Uttan kumpass og uttan



*Fiskaturking sum Pløyen upplivdi hana í 1839.*



*Føroysk slupp og sildabátar inni í Lerwick.*

at duga navigatión finna teir leiðirnar, har línan verður sett á 100 favna dýpi. Línan hevur søkk og flot, og eftir nakrar tímar verður línan drigin aftur, og teir rógva aftur til lands.

Er nógv at fáa verður fiskurin sum oftast avhøvdaður, so meiri fiskur kann rúmast í bátinum. Pløyen sigur, at tað er ótrúligt, hvussu stórar mongdir av fiski, hesir fiskimenn kunnu føra til lands. Hetta kundu okkara fiskimenn eisini gjørt, um teir brúktu línu, og um húkarnir ikki vóru so stórir, at bert teir størstu toskarnir kláraðu at gapa um teir. Føroyingar høvdu eisini tann fyrimunin, at fjøllini í Føroyum eru nógv hægri enn í Hetlandi og tí var eisini lættari at staðfesta miðini.

Tá báturin kemur at landi, verður hann móttikin av umboði fyri harramannin. Fiskurin verður vigaður, og avreiðingin verður góðskrivað á kontoina hjá viðkomandi.

### Útróðrarstøðir

Fyri at stytta um teinin at rógva, høvdu hetlendingar gjørt eina skipan, sum Pløyen heldur eisini átti at verið í Føroyum. So nær sum gjørligt við fiskimiðini settu teir á stovn útróðarstøðir, "haaf stations". Her høvdu teir skúrar við koyggjum, kundu gera sær mat, og hvíla tá møguleiki var fyri tí. Tann týdningarmesta útróðrarstøðin var á Feideland norðast á Mainland, meginoynni í Hetlandi. Her støðaðust fiskimenninir í vertíðini, sum var frá mai til 12. august. Her lá væl fyri at draga bátarnar upp á land, og hiðani var høgligt at rógva norður eftir og vestur eftir. Her varð fiskurin eisini virkaður, og her fekst øll møgulig útgerð. Her kundu 60 bátar halda til við 6 monnum á hvørjum t.v.s. 360 mans, umframt øll onnur, sum vóru knýtt at útróðrinum.

Tilsamans vóru upp til 3.000 fiskimenn, sum róðu út frá slíkum "haaf stations", sum tó minkaðu í týdningi, tá hetlendingar fóru at nýta sluppir heldur enn 6 mannafør.

Pløyen heldur, at Oyndarfjørður og Hvannasund høvdu verið góð pláss í Føroyum til hetta endamál, men, sum hann tekur til: Hetta letur seg neyvan gera, so leingi einahandilin er so einaveldigur, sum hann er. Eisini krevst kunnleiki til, hvussu ein slík skipan skal setast í verk. Kanska kundu vit latið hetlendingar sjálvar sett seg niður her og harvið víst okkum, hvussu hetta skal gerast? Hilmar Kass greiðir frá, at hetlendingar høvdu slíkar støðir á Strondum seinnapartin í 19. øld. Tá flutti enntá tvær kvinnur við aftur til Hetlands.

### Høvdu vrakarastovn

Tey týdningarmestu fiskasløgini eru longa, toskur og brosma, sum verða virkað til saltfisk. Men hetta krevur eisini serkunnleika, og í Hetlandi hava teir eisini ein vrakarastovn at tryggja dygdina á framleiðsluni.

Pløyen hevur í bókini eina leiðbeining fyri virking av saltfiski, sum er í 8 punktum. Hetta eru punkt, sum seinni eru væl kend í Føroyum, men sum tá vórðu at bróta upp úr nýggjum.

Pløyen umrøður eisini upsaveiðu í Hetlandi, sum



*Línan verður egnd.*

gevur nógv av sær. Serliga er nógvur upsi sunnanfyri Sumburgh Head, sunnast á Mainland. Orsøkin er tann nógvi streymurin, sum er har. Síðani eru teir komnir eftir, at upsi er eisini aðrastaðni, har tað er streymhart. Sum vit eisini kenna tað, stóð upsin ella seiðurin antin á djúpum vatni ella í vatnskorpuni, og reiðskapurin valdast, hvussu upsin stendur. Sum tað skilst verður dorg brúkt, tá upsin stendur ovarlaga.

Upsin gevur ikki eins góðan klippfisk og toskur. Men tá veiðan er bílig og nógv kann fáast, so loysir tað seg kortini.

Pløyen heldur seg vita, at upsi er fiskaður í Føroyum á hendan hátt fyrr í tíðini, og hann skilir ikki, hví henda veiðan er gloymd. Sjálvt um upsin ikki kann avreiðast, kann hann fiskast til egna nýtslu, og føroyingar plaga ikki at vera so kræsnir í mati! Hann ivast ikki á, at upsi man vera at fáa á Munkagrunninum, men bert royndir kunnu staðfesta hetta.

### Torvpressan

Hetta er ein samandráttur av tí, sum Pløyen í fyrsta umfari hevði at siga um fiskiskap. Nú skuldi leiðin ganga til Skotlands at kanna torvpressuna. Hagar fór hann við rutubátinum, sum sigldi eina ferð um vikuna til Aberdeen.

Ferðingin á landi var eisini sera framkomin. Ferðast var við postvogninum við ikki færri enn fýra hestum, so tað gekk við rúkandi ferð! Teir vóru júst byrjaðir við jarnbreytum, sum var eitt satt ævintýr, og hetta royndi Pløyen eisini. Aftan á nógv stríð eydnaðist honum at koma í samband við uppfinnaran av torvpressuni. Men her var ikki nógv at heinta. Pressan kundi bert taka eina torvu í senn. Eftir at hon var pressað, skuldi hon framvegis turkast, so her var ikki nógv at vinna, og tað frættist heldur ikki aftur um hana.

Í Skotlandi vitjaði Pløyen eisini eitt virki, sum virkaði lýsi úr spiki. Hann keypti sær eisini fræ at hava heim til Føroya.

Síðan fer Pløyen aftur til Hetlands, og hiðani fer hann til Orknoyggjarnar. Fremsta endamálið við hesi ferðini tykist at hava vera at útvega setepli. Hetta royndi hann eisini í Skotlandi, men nøgdirnar hann vildi hava vóru ov smáar til, at tað loysti seg at senda skip við teimum. Tann stóra forðingin var, at eitt skip, sum kom til Føroyar við farmi, ikki kundi taka farm við sær heim aftur. Hetta forðaði einahandilin fyri. Men nú fekk hann bílagt 350 tunnir av seteplum.

Pløyen royndi eisini at bøta um ferðasambandið til Danmarkar umvegis Hetland. Tað var nú sera óhøgligt ikki at hava samband til Danmarkar í eitt hálvt ár um veturin! Men tað eydnaðist ikki at fáa gjørt nakað á hesum øki.

Um Orknoyggjarnar sigur Pløyen, at her er tað landbúnaður, sum tann dominerandi vinnan, og teir hava eisini ein týðandi útflutning av landbúnaðarvørum. Her er tó eisini helt fitt av fiskiskapi.

### Sildaveiða

Pløyen fer so aftur til Hetlands, har hann hittir føroyingarnar aftur, sum hava verið her alla tíðina. Nú greiðir Pløyen teimum frá sildarfiskiskapinum, sum vit hava umrøtt fyrr. Sildin verður veidd við gørnum, og á landi verður hon geld, sum vit kalla tað, og saltað í tunnur. Sildin verður løgd í fløgur, so hetta gav heilt nógv arbeiði, serliga til konufólkini. Bert til at gera tunnur vóru 40 bøkjarar í sving.

Sildarveiðan var fyri fríar menn. Her áttu menn bát og reiðskap og vóru ikki heftir at harramonnum.

At enda ger Pløyen sammetingar millum hetlendingar og føroyingar. Hetlendingar eru kúgaður og undirbrotligir, men teir eru blíðir móti fremmandum. Størsti munurin er á konufólkunum. Klæðini hjá hetlendsku konufólkunum eru andstyggilig og ofta vóru tær skitnar. Tá var stórur munur á, at tær føroysku kvinnurnar riggaðu betur.

Íbúðarviðurskiftini vóru góð hjá tí betra slagnum, men stak vánalig hjá vanliga fólkinum. Tá var munur á, at tann vanligi føroyingurin búði betur.

Tann 5. september er tíðin komin at fara heim aftur. Sendinevndin fær serflutning heim, tí keypmaðurin Ogilvy letur teimum sína egnu slupp til heimferðina, og 9. september eru teir aftur í Føroyum, har alt framvegis "Gud være lovet" var, sum tá teir fóru.

Sum sagt er hetta ein hugtakandi bók, sum eigur at verða lisin av øllum. Bókin kann í hvussu er lænast á bóksavninum.

## SØVNINI Í SUMMAR

Í summar verður opið soleiðis:

Føroya Fornminnissavn
Avgreiðslan: tlf. 310700
Kúrdalsvegi 2, Hoyvík
mánadag - fríggjadag kl. 9 - 12 & kl.13 - 15
Framsýningin í Brekkutúni 6 tlf. 318076
Heima á Garði, Hoyvík
Í tíðarskeiðnum 15. mai - 15. september:
mánadag - fríggjadag kl. 10 - 17
leygardag og sunnudag kl. 14 - 17

Føroya Náttúrugripasavn tlf. 352300
Framsýningarnar á Debesartrøð:
Í tíðarskeiðnum 15. mai - 15. september:
mánadag - fríggjadag kl. 11 - 16
leygar- og sunnudag kl. 15 - 17

Føroya Landsskjalasavn tlf. 316677
Í tíðarskeiðnum 24. juli - 4. august stongt
Í tíðarskeiðnum 1. juni - 21. juli og
7. august - 31.august er lesistovan opin:
mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 10 - 16
mikudag stongt

Føroya landsbókasavn tlf. 311626
Í tíðarskeiðnum 19. juni - 1. september:
mánadag - fríggjadag kl. 10 - 15

Býarbókasavnið tlf. 302030
hevur opið sum vant:
mánadag - fríggjadag kl. 10 - 18
leygardag kl. 10 - 13

Listasavn Føroya tlf. 313579
Upplatingartíðir - Open hours
1. mai - 31. august
Týsdag / Tuesday - Fríggjadag / Friday kl. 11 - 16
Leygardag / Saturday - Sunnudag / Sunday kl. 14 - 17
Mánadag / Monday stongt /closed

Tórshavn, 24. mai 2006
Søvnini

# Tann alsamt styrkta norska krónan hóttir norska fiskivinnu

**Støðan í dag líkist støðuni í 2002, tá norska gjaldoyra førdi til vána kappingarføri, við tí úrslitið at nógv virkir, sum fingust við útflutning, fóru á húsagang.**



Soleiðis ljóðar niðurstøðan í eini kanning, sum dr. scient Øystein Myrland frá Norges Fiskerihøgskole hevur gjørt fyri Fiskeri og Havbruksnæringens Landsforening og Eksportutvalget for fisk.

Tað seinasta ári hava norðmenn merkt eina dupulta valutaeffekt. Meðan norska krónan er styrkt ímóti evruni og dollaranum, er íslendska krónan og kilenska pesoin vikna mótvegis somu valutaunum. Hetta ger at norskar fiskavørur gerast dýrari á marknaðinum enn fiskur frá teimum londum, sum norðmenn kappast við. FHL vísir á, at hetta er, eina sera óheppin støða hjá norsku vinnuni at vera komin í.

Síðani ársskifti hevur norska kr. styrkt seg við 10,4% móti dollaranum, 2,6 % móti evruni og 4,9 % móti japanska Yen, meðan t.d. íslendska krónan er viknað 11,6% mótvegis dollaranum og eitt tíðarskeið herfyri 17,8 % móti evruni.

Tað er serliga flakavinnan og pelagiska vinnan, sum merkja valutapressi mest. Alivinnan ávirkast ikki so nógva av hesum orsaka av, at eftirspurningurin er størri enn útboðið av laksi og prísurin tí sera høgur.


## Ársroknskapur

hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri 2005

| (1.000 kr) | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| RAKSTRARROKNSKAPUR | | |
| Inngjøld | 123,533 | 105,860 |
| Útgjøld v.m. | -119,158 | -109,983 |
| Tekniskt úrslit | 4,375 | -4,123 |
| Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | -10,649 | -10,808 |
| Úrslit áðrenn avskrivingar | -6,274 | -14,931 |
| Avskrivingar | -1,012 | - 655 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | -7,286 | -15,586 |
| Fíggjarpostar, netto | 17,951 | 19,231 |
| Úrslit áðrenn skatt og avgjald | 10,665 | 3,645 |
| Skattur og avgjald | -954 | -853 |
| Ársúrslit | 9,711 | 2,792 |
| FÍGGJARSTØÐA pr. 31. desember | | |
| Aktiv | | |
| Støðisogn íalt | 1,2?9 | 1,263 |
| Tíðaravmarkingar og forútgoldið | 15 | 169 |
| Skuldarar | 1,276 | 987 |
| Virðisbrøv | 475,526 | 472,119 |
| Tøkur peningur | 27,893 | 24,172 |
| Umsetningsogn íalt | 584,71? | 497,447 |
| Aktiv íalt | 585,9?9 | 498,710 |
| Passiv | | |
| Stovnsfæ | 93,840 | 93,840 |
| At flyta til komandi ár | 406,020 | 396,308 |
| Eginogn íalt | 499,860 | 490,148 |
| Skyldugur arbeiðsloysisstuðul | 4,826 | 6,966 |
| Ognarar | 906 | 1,082 |
| Onnur skuld | 0 | 110 |
| Tíðaravmarkingar | 347 | 394 |
| Skuld íalt | 6,079 | 8,562 |
| Passiv íalt | 585,9?9 | 498,710 |

[illegible]

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel [illegible] • Faks [illegible]
als@als.fo • www.als.fo



Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Sailor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad. Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satellite - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satellite - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satellite - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

Søla og service:
Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SYN og Service, sum vit eisini gera

Sp/f Contrive Jsp Ltd.
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

# Miðvísa einsrættingin av fjølmiðlunum

Í seinasta blaðnum høvdu vit eina lýsing av viðurskiftunum millum Portalin, Føroya Tele og Sosialin.

Hetta reisir tann áhugaverda spurningin, um vit ikki hava eina miðvísa einsrætting av tíðindaflutninginum, og serstakliga tí politiska tíðindaflutninginum í Føroyum.

Hetta átti at verið eitt evni, sum varð tikið upp til alment tjak, men so væl hevur einsrættingin verið gjørd, at hetta verður als ikki tikið uppá tungu.

Men fyri tað sleppa vit ikki endanum, og vit hava sent Føroya Tele fylgjandi bræv við kopi til Sosialin:




*Tað kann ikki kallast annað enn sensurur, tá endurtøku úr bløðunum um visjón2015 verður avmarkað til tvey "stjórnartrúgv" bløð.*

"Viðvíkjandi Portalinum

Hjálagt senda vit FF-blaðið frá 18. mai, har vit vísa á, at Føroya Tele gjøgnum Portalin fremur eina einsrætting av tíðindaflutninginum í Føroyum. Hetta verður gjørt við at lata eitt einstakt blað, Sosialin, fáa eina klára yvirvekt í tíðindaflutninginum á Portalinum.

Umframt innihaldið í greinini skal skoytast uppí, at samb. eini tí seinastu uppgerðini hjá Gallup, hevði Portalurin 32.055 brúkarar, meðan Dimmalætting - sum tann næsti fjølmiðilin - hevði 6.655. Lutfallið eru nærum 1:5. Verða Sportalurin og Planet lagt aftur at Portalinum verður lutfallið 1:7,5. Hetta er ein dominansur, sum minnir um einaræðislond. Tað er óneyðugt at siga, at ein slagsíða hjá Sosialinum verður fleirfaldað gjøgnum Portalin.

Um tað verður hugt at tilvísingum til aðrar fjølmiðlar í leitiskipanini, váttar hetta gongdina. Beinleiðis tilvísing til Sosialin er 100 ferðir, meðan tað til Dimmalætting - sum er sammetilig við Sosialin - bert hevur tilvísing 25 ferðir. Men til FF-blaðið er **null** tilvísing, og tað sama er galdandi fyri fleiri onnur bløð. Um FF-blaðið kann sigast, at tað kemur út 25 ferðir árliga við omanfyri 300 greinum. Hetta er tilfar, sum annars ikki kemur í onnur bløð, og vit hava eina breidd í politiska tíðindaflutninginum, sum hinir fjølmiðlarnir ikki hava. Vit kunnu skoyta uppí, at tað er ikki dagur, at vit ikki fáa fráboðan frá lesarum, sum meta FF-blaðið vera besta blað tey lesa, og tey eru fleiri, sum als ikki halda nakað annað blað. Tað er - í hvussu er - ikki nøkur saklig grundgeving fyri hesi útihýsing av FF-blaðnum og tess sjónarmiðum úr Portalinum.

Tað er sjálvsagt upp til Sosialin sjálvan, hvussu teir skipa sín egna tíðindaflutning, men tá talan er um ein so dominerandi tíðindaflutning hjá einari almennari fyritøku, so er greitt talan um sensur.

Vit hava eisini uppskot um, hvussu henda slagsíðan kann rættast upp aftur. Hetta kann gerast við at loysa Portalin frá Sosialinum og seta ein óheftan blaðstjóra á Portalinum, hvørs fremsta uppgáva skal vera at skipa fyri einum breiðum tíðindaflutningi, so flest møgulig sjónarmið verða lýst.

Vit fara annars at viðgera hetta mál nærri. Tí biðja vit um at fáa innlit í avtaluni millum Føroya Tele og Sosialin. Tað, vit hava fremsta áhugan fyri at vita, er, hvørt Sosialurin verður goldin av Føroya Tele og íroknað hvør ið fær lýsingainntøkurnar á Portalinum. Síðan vilja vit hava at vita, um Føroya Tele ongar treytir hevur sett fyri støðið á tíðindaflutninginum á Portalinum."

Løgmansskrivstovan fremur eisini sensur

So langt er tað nú komið, at sjálvt løgmansskrivstovan stuðlar upp undir hesa heilt greiðu einsrætting, sum er í politiska tíðindaflutninginum og verður hetta hjørt við beinleiðis sensuri. Hetta sæst á heimasíðuni viðvíkjandi Visjón 2015.

Ein partur av hesi heimasíðu skal eitast at vera ein endurgeving av tí, sum er skrivað í bløðunum um visjónina. Men henda endurgeving er avmarkað til at vera greinir úr Dimmalætting og Sosialinum.

Alt gott um hesi bæði bløðini, men tey umboða - í hvussu er - ikki nakað fjølbroytni. Teirra politiski tíðindaflutningur er stórt sæð identiskur, og tað verður - í hvussu er - ikki gingið politiska valdinum ov nær. Tað er ikki størri munur millum hesi bløðini enn tað var millum Pravda og Isvestija. Við hesi avmarking kann løgmaður kenna seg fullkomiliga tryggan.

Hinvegin fær hann á hendan hátt útilokað kritisk sjónarmið, sum kunnu koma fram í øðrum fjølmiðlunum. FF-blaðið hevur reist mál viðvíkjandi visióni, sum ikki eru av áhuga hjá Dimmalætting og Sosialin, og sum tí ikki kemur á umrøddu heimasíðu. Hetta er sjónarmið, sum umboðið fyri FF setti fram á tí stóra visjónsfundinum uppi á Hotel Føroyum í februar mánaði. Her varð spurt, um løgmaður ikki metti tørv vera á einum strategibólki, sum skuldi viðgera rættarstøðuna hjá borgaranum mótvegis politisku og umsitingarligi skipanina.

Hesin fyrispurningur varð sera illa móttikin, og tað skiltist, at hetta var eitt evni, sum als ikki var til diskussión, hóast FF kann vísa á fleiri dømi um, hvussu borgarin verður viðfarin av "systeminum".

Hóast vánaligu móttøkuna, so hava vit í blaðnum sett fram ítøkiligt uppskot um at seta ein slíkan bólk, sum tað sjálvsagt ikki verður svarað til.

Men støðan er tann, at tá sjónarmið - sum okkara - ikki verða mett at hava tíðindavirði hjá útvaldu fjølmiðlunum hjá løgmanni, so koma tey heldur ikki fram á hansara heimasíðu! Afturfyri síggja vit eisini á heimasíðuni, at luttøkan í ætlaða kjakinum á heimasíðuni er lítil og eingin.

Viðvíkjandi einsrættingini verður eisini víst til grein aðra staðni í blaðnum um útvarpið sum politiskur ørindamiðil.

BAADER
Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.
Pf. Petur Larsen
Tlf. 44 41 74
Fax. 44 42 65

AGN
sild
tobis
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur
...dagligt samband um alt landið
P/F KAMBUR
STRENDUR
telefon: 448095 - fax: 448744

Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík
Klaksvíkar Sjúkrahús
Nýtt telefonnummar:
Tlf. 45 45 45
3 x 45

# Gamlar manningarmyndir

Vit hava fingið hendur á fleiri gomlum myndum, har tað eru ein ella nakrir fáir fiskimenn á myndini. Hesar eru helst tiknar av Abdsalon Joensen í Íslandi. Vit vilja framvegis sera fegin frætta um nakar kennir menninar á myndunum. Tað er Føroya Fornminnissavn, ið eigur myndirnar.



*3350F03211*



*3350F03217*



*3350F03218*



*3350F03219*

Tíðindaskriv

# Nýggj bók




31 andaktir eftir Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara, komnar út í bók.

Hetta eru andaktir, sum fyrr hava staðið í FF-blaðnum.

Heitið er "Dýrur longsul", og um tað sigur høvundurin millum annað soleiðis:

*"Longsul millum menniskju kann vera dýrur. Dýrasti og størsti longsul, ið til er, er tó Guds longsul eftir tær - eftir mannaættini. Bøn mín er tí, at hesar andaktirnar koma at sýna tær: " nakað av Guds stóra og dýra longsli eftir tær - hvussu neyðugt og gott tað er at verða funnin og vunnin av Jesusi".*

31 andaktir eru í bókini, og tað er Heimamissiónsforlagið, ið gevur bókina út.

Bókin kostar 89 krónur og er at fáa frá Heimamissiónsforlagnum, tlf. 47 00 00 ella hmf@mission.fo og í bókhandlunum kring landið.

FF-blaðið www.fiskimannafelag.fo
Gerst haldari fyri einans 250 krónur um árið




## Hvítusunnu-broytingin

Og teir vórðu allir fyltir
av hinum heilaga anda.
Áp. 2,4

Hvítusunnudagur gjørdist tann stóri broytingardagurin. Ikki so at skilja, at lærusveinarnir hvørki høvdu trúð ella upplivað Guds dýrd ella mátt áðrenn hvítusunnudag. Tað høvdu teir. Kortini var nærum "alt" øðrvísi.

Broytingin sást týðiliga á teimum øllum, men óivað best hjá honum, ið vit lesa eina mest um - Pætur. Fyrr var hann veikur og ræddur. Nú var hann sterkur og óræddur. Fyrr avnoktaði hann Jesus og hevði stórt álit á sær sjálvum. Nú játtaði hann alment Jesus sum Harra og frelsara, og vitnaði um hann og hevði stórt álit á honum. Fyrr sveiggjaði hann egið svørð í egnari megi. Nú sveiggjaði hann andans svørð, sum er Guds orð, í Guds kraft og vísdómi. Broytingin var stór, sjónsk og gleðilig.

Allir fyltust av heilagum anda. So eru tað ikki bara nøkur útvald, við serligum evnum, við stórari trúgv ella við stórum vísdómi, sum kunnu verða fylt av andanum.

Lyftið um heilagan anda er til øll Guds børn, sum eru doypt í navni faðirsins, sonarins og hins heilaga anda, og sum liva í trúnni á Kristus.

Fyrsta hvítusunnudag boðaði Pætur tí: "Vendið um og ein og hvør tykkara lati seg doypa í navni Jesu Krists til fyrigeving syndanna, og tit skulu fáa gávu heilaga andans" Áp. 2,38

Jesus segði um andan, ið er triði persónurin í guddóminum, at hann skuldi sannføra heimin um synd, rættvísi og dóm. Hann er sannleikans andi, sum skuldi vegleiða til allan sannleikan. Hann skuldi dýrmeta Jesus, skuldi taka av Jesusi og geva lærusveinunum...Jóh. 16.

"Men tit skulu fáa kraft, tá ið heilagur andi kemur yvir tykkum, og tit skulu vera vitni míni bæði í Jerusalem... og líka til ytstu endamark á jørðini" Áp.1.8

Andin er tann sami í dag. Trýrt tú á Jesus, hevur tú andan.

Lat nú andan fylla teg og leiða teg, so kann Gud brúka teg í síni tænastu. Uttan andan kanst tú hvørki trúgva á Jesus ella tæna honum ella náa heim í dýrdina.

Gleðiliga Hvítusunnu.

# "Jógvan S"- málið og alment rættarloysi

Nú hevur "Jógvan S"-málið verið fyri í rættinum. Tað einasta vissa, sum vit fyrr hava greitt frá, er, at hetta mál fer at kosta skattaborgarunum eina milliónaupphædd. Í minsta lagi verður hon 2,5 mill. Tað er so upp til rættin at gera av, um størri endurgjalda skal latast, og hetta fæst at vita 4. juli, tá dómur fellur.

Tað, sum liggur púra fast, er, at tað alla tíðina hevur verið heilt greitt, at afturtøkan av fiskiloyvinum hjá "Jógvan S" var eitt greitt brot á tær mest grundleggjandi reglurnar í einum rættarsamfelagi, sum siga, at ein tilsøgn frá almennum myndugleika til borgara er bindandi. Er tilsøgnin ikki í lagi, er hetta trupulleiki hjá tí, sum hevur givið tilsøgnina og ikki tí, sum hevur fingið hana.

Tað, sum eisini er greitt, er, at ábyrgdina fyri hesum rættarbroti við fylgjandi rokning hevur landsstýrismaðurin, sum sat tá, nevniliga Jacob Vestergaard.

Tað er eingin ivi um, at í einum veruligum rættarsamfelagi hevði ein slík sak fingið avleiðingar fyri ein ráðharra, sum hevði ábyrgdina av framdu gerðini.

Men júst her síggja vit munin millum eitt rættarsamfelag og ein dunnuhyl sum tann føroyska. Fyrst er tað avdúkandi, at tað er bert ein flokkur og ein tingmaður, sum tosar um at plasera ábyrgd røttum stað, nevniliga Kári Højgaard.



*Løgmaður kann ikki gera nakað við ein landsstýrismann, sum hevur framt rættarbrot við fylgjandi millióna-endurgjald eftir kravi frá honum sjálvum.*

Sum svar uppá hetta kemur JV við teirri undanførslu, at hann visti væl, at tað, hann gjørdi, var ivasamt, men "politiska skipanin" kravdi hetta av honum, og má hetta sigast at vera beint í stríð við meginregluna í stýrisskipanarlógini, um ábyrgdina hjá landsstýrismonnum fyri egnu avgerðir.

Ein grundgeving var eisini, at "politiska skipanin" vildi gjalda seg burturúr at taka fiskiloyvið aftur. Tað er júst tað, sum ikki er hent. Víst skal tað almenna gjalda, men samstundis er fiskiloyvið framvegis givið.

Orsøkin til, at hinir flokkarnir eru so kúrrir, er, at teir eru samsekir í hesi støðu. Tað var fyrst og fremst tjóðveldisflokkurin, sum legði trýst á landsstýrismannin at fremja hetta rættarbrot. Men hann var stuðlaður dyggiliga av sitandi løgmanni, sum gramdi seg í Sosialinum um, at hansara stuðul til hetta rættarbrot ikki fekk somu umrøðu í fjølmiðlunum sum støðan hjá tjóðveldisflokkinum!

Tí situr Jacob Vestergaard fullkomiliga tryggur. Teir flokkar, sum kroystu hann til at pádraga landskassanum hetta millióna-endurgjald, standa seg best við at tiga, og tað fara teir eisini at gera.

Undanførslan hjá JV er løgfrøðin hjá landsstýrismálanevndini. Tað er eisini ein partur av hesi søgu, at ikki er alment staðfest, um tann fyrri dómurin í "Jógvan S"-málinum var ein undirkenning av hesi løgfrøði. Ein tingmaður reisti av røttum hendan spurning, men fekk átalu av løgtingsins formansskapi. Síðan var hesin spurningur myrkalagdur og tað sama varð nevndi løgtingsmaður.

Tað skal eisini havast í huga, at tað var henda sera ivasama løgfrøðin hjá landsstýrismálanevndini, sum er orsøkin til, at m.a. sitandi løgmaður hevur sína ábyrgd av hesum rættarbroti móti borgara við endurgjaldi.

Samstundis avvísir løgmaður í samband við sína visjónsætlan so mikið sum at viðgera rættindini hjá borgarunum mótvegis almenni skipanini.










FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569




Blondinan
Ein blondina varð steðga av politinum.
"Tú manglar eina nummarplátu", segði politisturin.
"Tað ger einki", segði blondinan,"eg dugi nummarið uttanat".

*****

Á skrivstovuni
"Eg vil hava meira í løn!"
"Jamen, tú fekk jú lønarhækkan í síðsta mánaði"
"Hmm...tað hevur konan einki sakt um".

*****

Hjá sálarfrøðinginum
"Eg havi marruna hvørja nátt - eg síggi vermóðir mína koma í móti mær ríðandi á eini stórari krokodillu. Eg fái gásarhold við tankan um tey óhugnaligu eyguni, tær hvøssu tennirnar, fráðan um munnin, tær hvøssu kløm
ar og tann ringa andan".
"Hatta ljóðar heilt óhugnaligt", segði sálarfrøðingurin.
"Bíða so til tú hoyrir um krokodilluna...".

*****

Hjá læknanum
"Maður tygara skal hava fullkomiligan frið", segði læknin og rætti konuni eina sovitablett.
"Alt í lagi, nær skal eg so geva honum tablettina?"
"Tú skalt ikki geva honum hana, tú skalt taka hana sjálv".

*****

Í rættinum
Dómarin sigur við ákærda:
"Tú ert vísur í, at tað var eitt óhapp at tú skeyt konuna?"
"Ja, hon stillaði seg frammanfyri vermóðir".

# Landingarmiðstøðin á Toftum havt aðalfund

Týsdagin hevði Landingarmiðstøðin á Toftum ársaðalfund. Hetta var ein aðalfundur, sum sæð hevur verið fram til í spenningi frá fyrsta degi, síðan felagið var stovnað 1. januar 2005.

Tá var tað, at Fiskamarknaðurin varð býttur sundur. Hann var upprunaliga stovnaður í 1992. Eftir eina trupla byrjan hevur yvirhøvur gingist væl. Frá at vera ein uppboðssøla gjørdist hon eisini ein landingarmiðstøð við "felags kassa", har hall av landingini varð goldið av vinningi av uppboðssøluni.

Tann 1. januar 2005 varð uppboðssøluparturin tískil lagdur í eitt nýtt felag, har gamli Fiskamarknaðurin átti 50% og Ráfiskaseljarafelagið 50%, meðan gamla uppboðssølan helt áfram sum ein landingarmiðstøð.

Tað vóru mong, sum ivaðust í, hvussu hetta fór at ganga fíggjarliga. "Alt annað líka" skuldi landingarmiðstøðin ikki havt nakran møguleika. Men tað hevur víst seg, at skal ein klára seg sjálvan, so klárar ein eisini seg sjálvan. Árið 2005 byrjaði illa, men so fór skútan at rætta seg upp aftur við tillagingum til nýggju støðuna. Nú vísti aðalfundurin eisini, at tað bar til, og roknskapurin er á góðari leið. Landingarmiðstøðin er eitt stórt arbeiðspláss. Her eru 70 ársverk, hetta merkir eisini, at fleiri arbeiða her tilsamans. Afturat hesum koma tey sum arbeiða á uppboðssøluni.

Samstundis klárar uppboðssølan seg eisini væl. Tað er eingin ivi um, at samlaða úrslitið er betri enn annars. Tað er eisini ein greiður fyrimunur, at gamla virkisøkið hjá Fiskamarknaðinum nú er býtt sundur, so hvør av leiðslunum kann taka sær av sínum øki.



*Nevnd og stjórn í Landingarmiðstøðini: Pauli Poulsen, Kristian Fríðrik Olsen, stjóri, Verna Olsen, Dánjal Jákup Vilhelm, næstformaður, Heðin Hansen, Harry Benjaminsen, formaður, Páll Gregersen, Theodor Olsen og Óli Jacobsen.*



*Kendir gestir á aðalfundi. F.v. Líggjas Johannesen, Ragnar Olsen og Hákun Jacobsen.*



*Tað lógu nógv skip á Toftum týsdagin.*



*Virksemið er stórt á Landingarmiðstøðini og eisini uttanfyri. Her bøta teir trol.*